# Tilfeingisgjøld á fiskivinnuna

**Arbeiðsskjal fyri Fiskimálaráðið**

*24. Februar 2011*

# Innihaldsyvirlit


Fororð ... 4

Arbeiðssetningurin og arbeiðið hjá bólkinum ... 5

Samandráttur og niðurstøða ... 6

1. Inngangur ... 8

1.1. Ogn Føroya fólks og tilfeingisrentan ... 9

2. Yvirskipað um tilfeingisskattaskipanir ... 11

2.1. Endamál við skatti og skattasløg ... 11

Yvirskotsgrundaður skattur ... 11

Uppboðssøla ... 11

Umsetnings- og nøgdargrundaður skattur ... 12

Fastur skattur ... 12

Kombinatión av skattum ... 12

2.2. Tilfeingisskattaskipanir og atlit ... 12

Einføld og gjøgnumskygd ... 13

Rættvís ... 13

Støðug ... 13

Skynsom ... 13

3. Lýsing av ymiskum sløgum av tilfeingisgjøldum ... 14

3.1. Er nøkur tilfeingisrenta í føroysku fiskivinnuni? ... 14

Vanligt avkast og tilfeingisrentan ... 15

Uppsjóvarskipini ... 15

Verksmiðjutrolararnir ... 16

Allur fiskiflotin ... 16

3.2. Sløg av tilfeingisskattum ... 16

Yvirskotsgrundaður skattur ... 17

Uppboðssøla ... 19

Umsetnings- og nøgdargrundaður skattur ... 21

Fastur skattur ... 22

4. Tilfeingisgjøld í øðrum londum ... 24

4.1. Ísland ... 24

4.2. Grønland ... 24

4.3. Norra ........ 26
4.4. Kili ........ 26
4.5. Estland ........ 27
5. Tilfeingisgjaldið í landskassan, í grunn/strukturgrunn ella annað ........ 28
5.1. Alment um skattahugtakið ........ 28
5.2. Tilfeingisgjaldið í serskildan grunn ........ 28
Alment um grunnar ........ 28
Um bygnaðargrunn ........ 29
5.3. Aðrir møguleikar ........ 29
5.4. Tilfeingisgjaldið fer í landskassan sum vanligur skattur ........ 30
6. Ískoytið ........ 31

# Fororð

Í sambandi við viðgerðina av fíggjarkarmunum fyri fíggjarárið 2011 í mars og apríl 2010 vóru møguleikarnir fyri at leggja tilfeingisskatt ella tilfeingisgjald á m.a. fiskivinnuna umrøddir í sambandi við ætlanina um at breiðka skattagrundarlagið. Tann 27. september 2010 varð lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um lands- og kommunuskatt lagt fyri Løgtingið. Ætlaða broytingin av skattalógini hevði við sær, at tilfeingisskattur skuldi gerast partur av skattalógini. Broytingin varð samtykt í Løgtinginum 28. desember 2010 og hevur broytingin við sær, at *"Inntøka frá fiski- og alivinnu verður áløgd ein tilfeingis/loyvisskatt á 2,5% av skattskyldugari inntøku, hægri enn 1.000.000 kr. Tilfeingis/loyvisskatturin tilfellur landskassanum."* Lógin er bara galdandi fyri árið 2011.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið frá 27. september 2010 verður sagt: *"Landsstýrið fer í heyst at seta arbeiðsbólkar, ið skulu greina framtíðarkarmarnar hjá alivinnuni og fiskivinnuni. Í hesum bólkum koma umboð fyri vinnuna at luttaka. Bólkarnir skulu eisini gera uppskot um, hvussu skatta- og avgjaldsviðurskiftini hjá hesum vinnum skulu verða í framtíðini."*

Í hesum sambandi setti Fiskimálaráðið í januar 2011 ein arbeiðsbólk at gera *"stutta lýsing av ymsum møguleikum fyri tilfeingisgjøldum á fiskivinnuna"*, og er arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum partur av greiningini, ið landsstýrið hevur sett sær fyri at gera.

Í skrivi frá Fiskimálaráðnum til arbeiðsbólkin verður sagt:

> *"Við hesum verður heitt á tykkum omanfyri nevndu um at luttaka í einum arbeiði vegna Fiskimálaráðið, ið hevur til endamáls at gera eina stutta lýsing av ymsum møguleikum fyri tilfeingisgjøldum á fiskivinnuna.*
>
> *Arbeiðið verður ætlandi stutt, ítøkiligt og miðvíst, soleiðis at frágreiðingin verður liðug longu um miðjan februar 2011 ella seint í tí mánaðinum.*
>
> *(...)*
>
> *Viðvíkjandi nýtsluni av tilfeingisgjaldinum er týðandi, at viðgerðin fevnir um 2 høvuðsumráði (kanska 3):*
>
> - *Tilfeingisgjaldið fer í landskassan sum vanligur skattur*
> - *Tilfeingisgjaldið fer í serskildan grunn, sum verður nýttur til tillagingar av vinnuni, m.a. við atliti at bygnaði og øðrum (onkur hevur kallað ein slíkan grunn "strukturgrunn"/"bygnaðargrunn)*
> - *Aðrir møguleikar*
>
> *Orðingin omanfyri er fyrsta útkast, og kann bólkurin gera nýggjar orðingar, um hesar tæna endamálinum betur."*

Í arbeiðsbólkinum hava sitið:

Dennis Holm, Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning
Klaus Rasmussen, sjálvstøðugur
Jóanna Djurhuus, Vinnumálaráðið
Heri Joensen, Fiskimálaráðið
Terji Petersen, Fíggjarmálaráðið

## Arbeiðssetningurin og arbeiðið hjá bólkinum

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum fevnir sostatt í fyrsta lagi um at gera eina lýsing av møguleikunum fyri tilfeingisgjøldum á fiskivinnuna og síðani um eitt tilfeingisgjald skal í landskassan sum vanligur skattur ella í serskildan grunn ella annað.

Fyri at svara hesum spurningum á best gjørligan hátt hevur arbeiðsbólkurin valt at býta arbeiðsskjalið í hesar partar:

**Samandráttur og niðurstøða.**

**Inngangur,** sum viðger bakgrundina fyri kjakinum um tilfeingisskatt, hugtøkini tilfeingisrenta og tilfeingisskattur/-gjald, umframt at endamálsorðingin í lógin um vinnuligan fiskiskap verður knýtt at hugtøkunum tilfeingisrenta og tilfeingisskattur/-gjald.

Í **2. parti** verður yvirskipað komið inn á grundhugsanir í sambandi við endamálini við skattaskipanum og hvørji atlit skattaskipanir eiga at taka, tá ið tær verða settar í verk. Hendan viðgerðin fevnir eisini um hvørji atlit eiga at verða tikin í sambandi við, at ein tilfeingisskattaskipan verður sett í verk.

**3. partur** er ein lýsing av ymsum sløgum av tilfeingisgjøldum/-skattum. Í hesum parti verður eisini viðgjørt, um tað í Føroyum er nøkur tilfeingisrenta at skatta.

Í **4. parti** verður stutt greitt frá tilfeingisgjøldum í øðrum londum.

**5. partur** viðger, hvussu inntøkurnar av einum tilfeingisgjaldi skulu nýtast.

## Samandráttur og niðurstøða

Ein fortreyt fyri at tosa um skatting av tilfeingisrentuni er, at tilfeingisrentan er til staðar, t.e. at tað finnst eitt avkast, sum kann verða skattað. Arbeiðsbólkurin er ikki vísur í, at tað innan allar fiskivinnubólkar finst ein tilfeingisrenta í dag og metir, at ein orsøk til hetta er skipanin av fiskivinnuni. Tó at arbeiðssetningurin hjá bólkinum ikki hevur verið at umrøða broytingar í fiskivinnubygnaðinum, verður mælt til, at umsitingin av fiskivinnuni verður umskipað soleiðis, at tilfeingisrentan verður so stór sum gjørligt. Orsakað av avmarkaðum arbeiðssetningin og avmarkaðari tíð at gera arbeiðsskjalið verður tó ikki komið við tilmælum til umskipan í hesum skjali.

Tá gjørdar verða serskattaskipanir fyri ávísar vinnur, eigur at verða hugsað um, um hesar ætlast at regulera ta ávísu vinnuna ella heldur til at býta virði í samfelagnum. Arbeiðsbólkurin metir, at vitanin um, hvussu skattaskipanir ávirka veiðutrýstið í fiskivinnuni, er ov lítil, og at fiskivinnan er ov óstøðug til, at tað kann roknast sum skilagott at regulera veiðutrýstið í fiskivinnuni við skattaskipanum. Mælt verður tí frá skattaamboðum, sum hava til endamáls at regulera fiskivinnuna. Serskatting av fiskivinnuni eigur heldur at verða gjørd í tann mun, politisk ynski eru um at býta virði frá vinnuni til onnur í samfelagnum.

Bólkurin hevur ikki sum part av sínari niðurstøðu, júst hvat býti av tilfeingisrentuni er rímiligt, men er tað ein politiskur og etiskur spurningur. Hinvegin hevur bólkurin umrøtt, hvussu ein slík skipan kundi sæð út við minst møguligum vansum fyri vinnubygnaðin, givið at politiski myndugleikin hevur tikið avgerð um slíkan tilfeingisskatt og ávíst býti av tilfeingisrentuni.

Mett verður, at tvær tilfeingisskattaskipanir eru, sum kunnu brúkast og sum kunnu fáa inn ein rímiligan part av tilfeingisrentuni:

Yvirskotsgrundaður skattur:

- Yvirskotsgrundaður skattur er ein skatting, sum er óheft av, hvussu vinnan er skipað
- Við yvirskotsgrundaðum skatti ber til at fáa ein part av tilfeingisrentuni í landskassan
- Eitt skynsamt skattatrýst ávirkar ikki atferðina, tí skattingin verður av yvirskoti
- Er skattingin ov stór, ávirkar hetta atferðina og vinnan vil broyta atferð fyri at optimera skattagjaldingina heldur enn raksturin

Uppboðssøla:

- Uppboðssøla er bæði ein skatting og ein regulering av vinnuni
- Við uppboðssølu ber til at fáa ein part av tilfeingisrentuni í landskassan
- Parturin av tilfeingisrentuni, sum fer í landskassan, er heftur at, hvussu stór kapping er um fiskirættindini. Potentialið til inntøkur hjá landskassanum er tó størri enn við yvirskotsgrundaðum skatti, tí keypararnir eru til reiðar at bjóða upp til virðið á rættindunum, t.e. landskassin fær potentielt alla tilfeingisrentuna
- Treytað av, hvussu uppboðsskipanin er skipað, er størri váði hjá vinnuni, tí vinnan ikki er vitandi um óvissar faktorar sum t.d. veiðunøgd (tá tað snýr seg um fiskidagar), oljuprís, søluprís o.a. í upp til eitt heilt ár frammanundan, at sølan verður realiserað
- Ein fortreyt fyri eini uppboðssøluskipan er, at fiskivinnan í størri mun má avregulerast – ov nógvar avmarkingar forða fyri tillagingum og forða fyri kapping

- Í mun til yvirskotsgrundaðan skatt fer ein uppboðssøluskipan at hava stóra ávirkan á vinnubygnaðin, tí spælireglurnar broytast og við teimum atferð
- Ein uppboðssøluskipan kann hava við sær óætlaðar avleiðingar, t.d. við monopolisering og ov stórum váða í sambandi við keyp av kvotum (keypa dýrt fyri at fáa ein part)
- Sæð úr einum skattasjónarhorni er uppboðssøla ikki eitt neyvt amboð. Ymisk viðurskifti í sambandi við uppboðssøluna kunnu føra við sær bæði ov lága og ov høga skatting

Tá ein skattaskipan fyri tilfeingi verður gjørd, er neyðugt at taka tey vanligu skattligu atlitini, t.e. at skipanin skal vera: 1) einføld og gjøgnumskygd, 2) rættvís, 3) støðug, og 4) skynsom.

Hugt er eftir royndum við tilfeingisgjøldum í øðrum londum. Hóast nógv kjak um tilfeingisrentu og –gjald, so eru ikki nógv dømi um slíkar skipanir aðrastaðni. Ísland er eitt av dømum, har tilfeingisgjald er álagt vinnuni.

Arbeiðsbólkurin metir, at inntøkurnar frá tilfeingisgjaldinum eiga at fara í landskassan heldur enn í serstakar grunnar.

# 1. Inngangur

Seinastu áratíggjuni er hugtakið *"rights-based-management"* vorðið týðandi partur av umsiting av fiskitilfeinginum í havinum. Kjarnin í hugtakinum snýr seg í stuttum um at fyri at sleppa undan ovurfisking, mugu rættindini til at troyta fiskitilfeingi avmarkast, bæði tá umræður atgongd at fiska (tal av skipum), og hvussu nógv kann fiskast (tal av fiskidøgum ella nøgd av tonsum ella báðum).

> *"**Rights-based management**" merkir, at fiskivinnan verður umsitin soleiðis, at rættindini at troyta tilfeingið verða latin avmarkaðum skara av persónum, feløgum ella øðrum, soleiðis at hesi, hvør sær, fáa tillutað ein part av fiskitilfeinginum, antin sum ávíst tal av fiskidøgum og/ella ávísa kvotu.*

Umsitingin av føroysku fiskivinnuni á sjógvi er eisini skipað út frá hesari meginreglu. Lóggávumyndugleikin at regulera føroysku fiskivinnuna er á Føroya Løgtingi, sum kann áseta, hvussu føroyska fiskivinnan skal umsitast. Løgtingið hevur við løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap ásett, at møguleikarnir at reka fiskiskap í Føroyum skulu avmarkast við fiski- og veiðuloyvum, og er rætturin til at nýta fiskitilfeingi í havinum sostatt avmarkaður. Fiskiskapurin á føroyska landgrunninum er avmarkaður við tali av fiskiloyvum og við tillutaðum fiskidøgum. Veiðan hjá uppsjóvarflotanum og langfaraflotanum er somuleiðis skipað við tal av fiskiloyvum og síðani avmarkað við kvotum til hvørt skip ella felagskvotu til skipabólkin. Hetta eru eisini skipanir, sum vit kenna úr grannalondum okkara og aðrastaðni í heiminum.

Við øðrum orðum er vanligt, at fiskivinnan verður umsitin á slíkan hátt, at atgongdin at troyta fiskitilfeingið í havinum er avmarkað. Og við einari góðari umsiting av fiskivinnuni verður sostatt ein møguleiki at fáa óvanligan vinning burturúr avmarkingunum til at troyta fiskitilfeingið í havinum. Í kjalavørrinum av hesum er so komið kjakið, um tað er rímiligt, at nøkur fáa møguleikan at fáa ein óvanligan vinning burturúr einum tilfeingi, sum alt samfelagið eigur. Og tað er eisini í hesum sambandi, at hugtøkini *tilfeingisrenta* og *tilfeingisskattur* ella *–gjald* gerast partur av kjakinum.

> ***Tilfeingisrenta og tilfeingisskattur/-gjald***
>
> *Undir vanligum umstøðum er vanliga avkasti hjá eini fyritøku m.a. ávirkað av, hvussu lønsamt ein keypt rávøra kann framleiðast av arbeiðsmegi og maskinum. Fiskivinnan hevur higartil ikki rindað nakað fyri rávøruna, sum er "framleidd av náttúruni", hóast hendan rávøran hevur eitt virði.*
>
> *Við avmarkaðari atgongd til "ókeypis" rávøru fær fiskivinnan møguleika at skapa eitt seravkast, ella eitt óvanliga stórt avkast, í mun til aðrar vinnur. Hetta óvanliga stóra avkastið verður kallað **tilfeingisrentan**. Møguleikin hjá vinnuni at skapa eitt óvanligt avkast er tó í stóran mun tengt at umsitingini av fiskivinnuni. Tað er ikki givið, at vinnan megnar at skapa hetta óvanliga avkastið.*
>
> *Við útgangsstøðið í teirri fatan, at fiskurin er ogn Føroya fólks, kann tað í samfelagnum metast rímiligt, at ein partur av óvanliga avkastinum fellur aftur til samfelagið. Ella við øðrum oðrum: At ein **tilfeingisskattur / tilfeingisgjald** verður lagdur á **tilfeingisrentuna**, soleiðis at partar av henni fella aftur til samfelagið. Fyritreytin er tó, at tað er ein tilfeingisrenta at skatta.*
>
> *Í 2011 er álagdur fiskivinnuni ein tilfeingis-/loyivsskattur.*

**Mynd 1. Tilfeingisrenta og tilfeingisskattur**

**Tilfeingis-renta = Avreiðingar-virðið - Tilfars-nýtsla - Løn - Kapital-kostnaður - Vanligt avlop**

- Avreiðingarvirðið:
  - Nøgd
  - Prísir
- Tilfarsnýtsla:
  - Olja
  - Amboð
- Kapitalkostnaður:
  - Rentur
  - Avskrivingar

Tilfeingisrentan verður definerað sum avreiðingar-virðið frádrigið kostnaðir og "vanligt" avlop. Sostatt er tilfeingisrentan tað sama sum tað avlopið, sum er hægri enn "vanligt" avlop.

Tann grøni kassin (nøgd og prísir) ávirkar tilfeingisrentuna uppeftir. Reyðu kassarnir ávirka rentuna niðureftir

Leggjast skal tilmerkis, at við verandi lønarskipan í fiskivinnuni vil hækkandi avreiðingarvirði føra til hækkandi løn. Sostatt vil ein hækking í prísi ella nøgd einans partvíst ávirka tilfeingisrentuna uppeftir.

Eitt tilfeingisgjald / tilfeingisskattur er ein skatting av tilfeingisrentuni – t.e. ein skatting av bláa kassanum – ella við øðrum orðum ein skatting av tí óvanliga avlopinum.

## 1.1. Ogn Føroya fólks og tilfeingisrentan

Føroyar eru ein fiskivinnutjóð, og fiskurin, ið svimur í havinum kring Føroyar, hevur stórt virði. Í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap er ásett, at fiskurin er *ogn Føroya fólks*, t.e. nakað, sum samfelagið eigur. Hetta førir so til spurningin um, hvussu myndugleikarnir tryggja, at fiskiríkidømið kastar so nógv av sær til samfelagið sum gjørligt. Og hvussu verður tryggjað, at samfelagið fær lut í hesum ríkidømi.

Í § 2, stk. 1, í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, er ásett, at (okkara undirstriking):

> *"Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga, við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni, støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið."*

Sostatt ásetur lógin, at tilfeingið búskaparliga skal gagnnýtast so burðardygt sum gjørligt. Hetta merkir m.a., at so lítið tilfar (kapitalur, arbeiðsmegi, olja o.a.) sum møguligt skal nýtast fyri at fáa fatur á fiskinum. Somuleiðis skal tilfeingið tryggja best møguliga íkastið til samfelagið. Hetta merkir, at tað virðið, sum havið kastar av sær, skal verða so stórt sum gjørligt í longdini. Hesar báðar ásetingarnar í lógini merkja í stuttum, at tað ræður um at fáa tað óvanliga avkastið av náttúruríkidøminum í havinum, tilfeingisrentuna, so stórt sum gjørligt.

Í lógini um vinnuligan fiskiskap – brotið omanfyri – eru tó eisini aðrar ásetingar, sum fiskivinnan skal umsitast út frá, m.a. "*støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið*". Hendan ásetingin hevur m.a. havt við sær, at fiskivinnan í dag verður umsitin við einari røð av avmarkingum, sum gera tað trupult at lúka treytirnar um fáa tilfeingisrentuna so stóra sum gjørligt.

Avmarkingarnar hjá vinnuni fevna m.a. um:

- Útlendskir eigarar kunnu í mesta lagi eiga ein triðing av einum reiðaríi
- Tað er ikki loyvt at avreiða meira enn eina ávísa nøgd uttanlands
- Yvirmenn á føroyskum fiskiskipum skulu hava føroysk sjóvinnubrøv
- Fiskidagaskipanin er býtt sundur í ymiskar skipabólkar
- Mark er fyri hvussu nógv skip og/ella fiskidagar kunnu vera í hvørjum skipabólki
- Mark er fyri hvussu nógv skip og/ella fiskidagar ein einstakur reiðari/fiskimaður kann ráða yvir
- Ávísar avmarkingar eru í samband við avhending av fiskidøgum millum skipabólkar
- Loyvi krevst at framleiða fisk, fiskaður á føroyska landgrunninum, umborð
- Avmarkingar eru í samband við útlendska manning umborð á føroyskum fiskiskipum

Í nógvum førum eru hesar avmarkingar í andsøgn við ásetingarnar í lógini um búskaparliga burðardygd og íkast. Spurningurin er, um avmarkingarnar, sum m.a. eru ætlaðar at skapa so stórt vinnuvirksemi í landinum sum til ber, eru ein forðing fyri, at vinnan kann virka fíggjarligt optimalt, soleiðis at samlaða samfelagsliga íkastið gerst so stórt sum gjørligt.

Arbeiðsbólkurin er av teirri sannføring, at tað er ein stór avbjóðing hjá politiska myndugleikanum at skipa soleiðis fyri, at vinnan kann virka so burðardygt sum gjørligt og geva so stórt íkast til samfelagið sum gjørligt. Ella við øðrum orðum, at vinnan skal kunna virka soleiðis, at tilfeingisrentan verður so stór sum gjørligt.

Ein fortreyt fyri at tosa um skatting av tilfeingisrentuni er, at tilfeingisrentan er tilstaðar, t.e. at tað finst eitt avkast, sum kann skattast.

Í næsta parti verður umrøtt, hvussu skatting sum heild og tilfeingisskattur kunnu skipast.

## 2. Yvirskipað um tilfeingisskattaskipanir

Høvuðsendamálið við at krevja inn skatt er at fáa til vega inntøkur at reka almenna geiran. Skattaskipanir kunnu og verða yvirskipað brúktar til tvey ymisk endamál: at *umfordeila virðir* og til at *regulera atferð*. Hetta er eisini galdandi fyri tilfeingisskattaskipanir.

Avbjóðingin við tilfeingisskattaskipanum er sostatt tann sama sum í skattaskipanum sum heild, og er her neyðugt at hugsa um (1) *hvussu umfordeilt kann verða við minst negativa árini á framleidnið* ella (2) *hvussu skattur kann regulera atferð* (til dømis við at leggja gjøld á umhvørvisdálkandi virksemi). Hesar avbjóðingar eru stórir partar av modernaðari búskaparfrøðiligari skattaástøði.

Niðanfyri verða ymisk endamál við skatti á tilfeingisvinnur umrøtt, eins og amboð til at røkka hesum málum verða kjakað.

### 2.1. Endamál við skatti og skattasløg

Í vanligari búskaparfrøðiligari ástøði verður følt fram, at spurningar um rætt býtið av byrðum og virðum í samfelagnum ikki kann svarast búskaparfrøðiliga, men at tað er ein etiskur og politiskur spurningur. Er politiskt avgerð tikin um t.d. at breiðka skattagrundarlagið, so ber ofta til at geva búskaparfrøðiliga grundað boð um, hvussu hetta best verður gjørt. Skattir, sum ofta vera umrøddir, eru: Yvirskotsgrundaður skattur, umsetningsgrundaður skattur, nøgdargrundaður skattur, fastur skattur, uppboðssøla ella eitt bland av nevndu háttum. Niðanfyri verða skattasløgini umrødd.

#### Yvirskotsgrundaður skattur

Yvirskotsgrundaður skattur er ein skattur, lagdur á inntøkur minus útreiðslur. Hetta verður roknað sum ein skattur, sum í sera lítlan mun fær fyritøkur at broyta atferð og tí er eitt gott skattaamboð.

Mótargumentið móti yvirskotsskatti kann tó vera, at tað skattliga úrslitið víkir frá tí veruliga úrslitinum, og kann hetta ávirka atferðina.

Serligt við einum yvirskotsgrundaðum tilfeingisskatti – sum er ein serskattur afturat vanliga partafelagsskattinum – er, at yvirskotsskatturin verður ymiskur fyri tilfeingisvinnur og aðrar vinnur. Hetta kann eggja til, at roynt verður at flyta skattligt úrslit frá tilfeingisvinnum til aðrar vinnur fyri at sleppa undan at gjalda skatt.

#### Uppboðssøla

Loyvi at reka virksemi verður lutað út til tey, ið keypa tey á uppboðssølu. Við teirri fyritreyt at keypararnir hava fullgóða vitan (perfect information) og eru í kapping, ber búskaparástøðiligt til at vísa, at útbjóðarin av loyvunum fær júst rætta prísin fyri loyvini, tí ongin vil keypa fyri hægri prís enn loyvini eru verd, og ongin hevði fingið loyvini fyri undir virði, orsakað av, at onkur so hevði verið klárur at bjóða yvir.

Eins og yvirskotsgrundaður skattur ávirkar slík uppboðssøla ikki marginalframleidnið. Uppboðssøla verður tó meira fløkt, um keyparin ikki hevur fullgóða vitan og í tí sambandi er serliga teoriin um *winner's curse*

viðkomandi. Henda ástøðin sigur stutt, at í førum, har bjóðarar í eini uppboðssølu ikki kenna veruliga virði á tí, sum er á uppboðssølu, er vandi fyri, at vinnararnir av uppboðssøluni keypa ov dýrt og at uppboðssøluskipanin tí skapar óstabilitet. Manglandi kapping kann tó føra við sær, at rættindini verða seld ov bíliga.

### Umsetnings- og nøgdargrundaður skattur

**Umsetningsgrundaður skattur** er ein skattur, roknaður á inntøkur, t.e. uttan at draga útreiðslur frá. Umsetningsgrundaður skattur kann ávirka marginalframleidnið, tí marginalinntøkan lækkar: Um til dømis hvør framleiðslueind gevur ein umsetning á 1.000 kr. og yvirskot áðrenn skatt á 10 kr, hevði ein umsetningsskattur á 2 % givið ein skatt á 20 kr. og hevði hetta ført við sær eitt úrslit eftir skatt á -10 kr. Framleiðslan hevði tá steðgað, hóast virksemið er samfelagsliga lønandi. Støddin á einum umsetningsgrundaðum skatti eigur sostatt at vera ásett við varsemi, tí skatturin kann minka um virksemið.

**Nøgdargrundaður skattur** er ein skattur, grundaður á nøgd (til dømis ávíst gjald fyri hvørt kilo av fiski). Eins og umsetningsgrundaður skattur kann nøgdargrundaður skattur ávirka marginalframleidnið, tí marginalinntøkan minkar. Í mun til umsetningsskatt er nøgdargrundaður skattur øðrvísi við at framleiðarin hevur váðan av prísbroytingum. Roknast kann tí við, at framleiðslunøgdin verður meira prísviðkvom enn undir øðrum skattaskipanum.

### Fastur skattur

Fastur skattur er ein skattur, hvørs stødd er føst og sostatt óheft av framleiðsluni. Fastur skattur hevur ikki ávirkan á framleiðsluinntøkur ella -útreiðslur og hevur tí ikki ávirkan á framleiðsluna, *um* framleiðslan fer í gongd. Tó er vandi fyri, at framleiðslan ikki fer í gongd, um fasta gjaldið er ov høgt í mun til yvirskotið, til dømis um roknað verður við, at virksemið undan skatti gevur eitt yvirskot á 1 mió. kr., samstundis sum fasti skatturin er 2 mió. kr., so verður framleiðslan ikki sett í gongd, hóast hon hevði verið samfelagsliga lønandi. Ansast skal tí væl eftir støddini á slíkum føstum skatti og ivasamt er, um til ber at sleppa undan at regulera støddina á hesum regluliga. Endamálið við føstum skatti hevði tá neyvan verið rokkið kortini.

### Kombinatión av skattum

Skattasløgini, nevnd omanfyri, kunnu nevnast høvuðsskattasløgini, men til ber eisini at kombinera ymisk sløg av skattum. Sum dømi um ein blandingsskatt kann nevnast íslendski fiskitilfeingisskatturin, ið er grundaður á veiðuvirði frádrigið ein roknaðan kostnað av hýru, olju og øðrum kostnaði. Íslendska skipanin er sostatt grundað á umsetning, men verður regulerað til at líkjast einum yvirskotsgrundaðum skatti.

## 2.2. Tilfeingisskattaskipanir og atlit

Um tað er gjørt av at leggja tilfeingisskatt á tilfeingisrentuna, so er neyðugt at taka tey vanligu skattligu atlitini, t.e. at skipanin skal vera: 1) einføld og gjøgnumskygd, 2) rættvís, 3) støðug, og 4) skynsom.

## Einføld og gjøgnumskygd

Tað er av stórum týdning fyri tilfeingisskattaskipanir (eins og aðrar skattaskipanir), at tær eru einfaldar fyri bæði vinnuna og myndugleikan. Vinnan skal til eina og hvørja tíð kunna rokna út, hvussu stórur tilfeingisskatturin er. Hjá myndugleikunum skal skipanin verða einføld at umsita, soleiðis at útreiðslurnar av at umsita skipanina verða so lítlar sum gjørligt.

Jú einfaldari skipanin er, jú lættari er hon at gjøgnumskoða, og jú færri feilir verða gjørdir. Er skipanin einføld, er eisini hugsandi, at hon ikki hevur nógvar ótilætlaðar avleiðingar.

## Rættvís

Rættvísiskenslan er sjálvandi í øllum skattaskipanum ein fyritreyt fyri, at skattaskipanirnar kunnu vera breitt góðtiknar og tí virka. Harumframt skal takast við, at rættvísi í flestu førum má sigast at vera ein spurningur um býtið av úrsliti, ikki um ein skattaskipan betrar effektivitet.

Ein tilfeingisskattaskipan hevur sum serligt frábregdi, at tær ikki fevna um øll sløg av framleiðslu, men einans tilfeingisgrundaða framleiðslu. Ein slík asymmetrisk skattaskipan fyri tilfeingisvinnur kann óivað vera fatað sum órímilig av teimum, sum eru í hesum vinnum (hví skulu tey gjalda skatt, sum onnur ikki gjalda?), men eisini av teimum, sum ikki luttaka í vinnunum (áttu tey ikki at gjaldað fyri rættindini, sum onnur ikki hava atgongd til?), og kann hugsast, at tey, sum ikki hava fingið loyvi at luttaka í tilfeingisvinnum, halda, at skatturin skal vera so høgur, at tað ikki kenst sum at tey eru fyri vanbýti.

Útgangsstøðið er, at tilfeingið er ogn samfelagsins, og avbjóðingin er tá, at tað verður gjørt eitt rættvíst býtið av tilfeingisrentuni millum vinnuna og samfelagið.

## Støðug

Tað hevur týdning, at tilfeingisskatturin er nøkulunda støðugur frá einum ári til annað. Verður tilfeingisskatturin broyttur munandi ár um ár, kann hetta fáa stóra ávirkan á vinnuna. Fyri at kunna leggja ætlanir og taka avgerðir um íløgur má vinnan hava støðugar karmar at virka undir.

## Skynsom

Ásetingin av tilfeingisskattinum eigur at verða gjørd við skynsemi. Er skatturin ov høgur, kann hetta hava við sær broytta atferð, sum kann hava við sær, at tilfeingisrentan minkar.

# 3. Lýsing av ymiskum sløgum av tilfeingisgjøldum

Í hesum partinum verða ymisk sløg av tilfeingisgjøldum/-skattum lýst nærri. Fyrst verður viðgjørt, um tað í Føroyum, sum er, er nøkur tilfeingisrenta at skatta.

## 3.1. Er nøkur tilfeingisrenta í føroysku fiskivinnuni?

Fyrst verður hugt nærri at, um tað í føroysku fiskivinnuni er ella hevur verið nøkur tilfeingisrenta. P/F Nota hevur í nøkur ár savnað roknskapir fyri at kalla allan tann føroyska fiskiflotan. Í ískoyti 1 eru talvur yvir rakstrarúrslitið hjá øllum flotanum, hjá uppsjóvarflotanum og hjá verksmiðjutrolarunum tey seinastu 14 árini – tíðarskeiðið 1996-2009. Umframt rakstrarúrslitið er eisini hvørt ár roknað, hvussu eginpeningurin er rentaður. Tað hevur ikki verið gjørligt at greina taltilfarið nágreiniliga, men nakrar einfaldar útrokningar kunnu tó geva ábendingar um inntjeningina hjá fiskivinnuni. Greiðari niðurstøður eiga at verða grundaðar á meiri nágreiniligar lýsingar av inntjeningini í fiskivinnuni.

Verður hugt at tølunum fyri allan fiskiflotan, so fevnir roknskapartilfarið um ársroknskapir fyri í miðal 85 skip. Í 14 ára tíðarskeiðnum frá 1996 til 2009 fiskaði flotin fyri eitt samlað virði upp á 22.135 mió. kr. Lønarútgjaldingarnar hava verið 8.797 mió. kr. og er avlopið áðrenn skatt 1.742 mió. kr., men tó skal viðmerkjast, at óvanligir postar tilsamans fevna um næstan helvtina av yvirskotinum ella 844 mió. kr. Av samlaða úrslitinum upp á 1.742 mió. kr. eru 363 mió. kr. útreiðsluførdar sum skattur, og er nettoavlopið tí 1.378 mió. kr. fyri tey 14 árini samanlagt. Verða ársúrslitini fyri hvørt ár gjørd upp í mun til eginpeningin við árslok/ultimo (upplýsingar um støddina á eginpeninginum við ársbyrjan eru ikki tøkur í tilfarinum) sæst, at eginpeningsavkastið sveiggjar millum 46,9% tað besta árið (2006) og -8,1% tað vánaligasta árið (2009). Verður eitt einfalt miðal fyri hvørt ár roknað, fæst eitt miðal avkast á 15,3% av eginpeninginum.

Tann óvanliga inntøkan er rættiliga stór í mun til vanliga raksturin. Ein av orsøkunum er inntøka frá sølu av skipum við vinningi, og í slíkum førum kann sigast, at talan er um eina kapitalisering av einari framtíðar tilfeingisrentu – ella í øllum førum at talan er um, at keyparin rindar í teirri trúgv, at tilfeingisrenta í framtíðini kemur til sjóndar. Verður eginpeningsavkastið roknað, uttan at óvanligir postar verða tiknir við (og korrigerað verður fyri skatti av hesum), so er vánaligasta úrslitið í tíðarskeiðinum eitt avkast á -22,6% (2008), meðan tað besta árið vísti eitt eginpeningsavkast á 29,4% (1998). Eitt roknað miðaltal fyri tey 14 árini vísir eitt eginpeningsavkast á 7,7%, tá óvanligir postar ikki eru tiknir við.

Fyri allan fiskiflotan undir einum benda roknskapartølini á, at tað ikki í sjálvum rakstrinum er realiserað nøkur tilfeingisrenta hesi seinastu 14 árini. Einstakir aktørar kunnu tó umvegis sølu av skipum hava realiserað stóran vinning. Ástøðiliga kann í slíkum førum sigast, at tað í hesum einstøku førunum er talan um eina kapitalisering av einari framtíðar tilfeingisrentu, men tað kann tó henda, at tann væntaða framtíðar tilfeingisrentan ongantíð gerst veruleiki. Vinningurin hjá seljaranum vil hinvegin gerast partur av framtíðar kapitalkostnaðinum hjá keyparanum, hetta umvegis hægri avskrivingar og hægri fíggjarkostnaðir, sum alt annað líka vilja tyngja framtíðar raksturin og minka um avkastið. Umframt hetta kann tilfeingisrentan eisini kapitaliserast umvegis sølu av partabrøvum, og í tann mun hetta er gjørt tey seinastu 14 árini, so er hetta *ikki* við í uppgerðunum av roknskapartølunum fyri flotan.

## Vanligt avkast og tilfeingisrentan

Spurningurin er, nær talan er um eitt vanligt avkast, og nær talan er um, at tilfeingisrentan er realiserað? Í hesum arbeiðsskjalinum skal ikki gerast nøkur meting um støddina á vanliga avkastinum, men víst eigur tó at verða á, at í øllum vinnum – eisini í vinnum, har tað ikki er talan um eina avmarkaða atgongd til nýtsluna av einum tilfeingi, sum samfelagið eigur – er tað soleiðis, at nakrir aktørar klára seg væl, meðan aðrir klára seg illa. Fyri teir einstøku aktørarnir í fiskivinnuni vil tað altíð vera soleiðis, at nakrir klára seg betri enn aðrir, og munurin kann vera stórur. Hetta merkir tó ikki, at aktørar við góðum úrslitum realiserað eina tilfeingisrentu, meðan teir minni góðu aktørarnir ikki realiserað tilfeingisrentuna. Heldur er talan um, at hyggjast má eftir einum miðal úrsliti fyri at meta um, um ein tilfeingisrenta er realiserað í fiskivinnuni. Tá tosað verður um vanligt avkast, eigur eisini at verða tikið inn í myndina, at hetta hugtakið hongur neyvt saman við váðanum í teirri ávísu vinnuni. Jú hægri váði, jú hægri avkast vilja aktørarnir í teirri ávísu vinnuni krevja fyri at taka lut í vinnuni.

Ástøðiliga kundi nógv tala fyri, at tað átti at verið ein tilfeingisrenta í fiskivinnuni. Men tá hon so ikki er vorðin sjónlig, so er ein eyðsædd orsøk, at umsitingin av fiskivinnuni ikki hevur dugað nóg væl at tryggja, at tilfeingisrentan kann realiserast.

Men umsitingin av ávísum økjum av fiskivinnuni kann tó hugsast at hava ført við sær eina tilfeingisrentu. Tí verður stutt hugt eftir úrslitunum hjá teimum pørtum av fiskiflotanum, sum oftani verða umrøddur sum teir mest rentablu, nevniliga uppsjóvarflotin og verksmiðjutrolararnir.

## Uppsjóvarskipini

Uppsjóvarskipini hava í árunum 1996 til 2009 í miðal verið millum 8 og 9 í tali. Tilsamans hava skipini í hesi 14 árini fiskað fyri 5.629 mió. kr. ella umleið 25% av inntøkunum hjá øllum flotanum. Lønarútgjaldingarnar hava verið 1.796 mió. kr., og avlopið áðrenn skatt hevur verið 1.278 mió. kr. Lagt eigur at verða til merkis, at teir óvanligu postarnir tilsamans fevna um 550 mió. kr. ella umleið 43% av tí samlaða avlopinum áðrenn skatt. Av tí samlaða úrslitinum á 1.278 mió. kr. eru 251 mió. kr. útreiðsluførdar sum skattur, og gevur hetta eitt nettoavlop á 1.027 mió. kr. Verður úrslitið fyri hvør ár gjørt upp í mun til eginpeningin við árslok sæst, at eginpeningsavkastið sveiggjar millum 132,7% tað besta árið (2006) og -6,9% tað vánaligasta árið (1999). Verður roknað eitt einfalt miðal eginpeningsavkast fyri hvørt ár, so fæst eitt miðal avkast á 33,9% av eginpeninginum.

Tær óvanligu inntøkurnar hava verið óvanliga stórar í mun til vanliga raksturin. Ein av orsøkunum er helst inntøka frá sølu av skipum við vinningi, og í slíkum førum kann sigast at talan er um eina kapitalisering av einari framtíðar tilfeingisrentu – ella í øllum førum at talan er um, at keyparin rindar í teirri trúgv, at tilfeingisrenta í framtíðini kemur til sjóndar. Verður forretningin av eginpeninginum roknað, uttan at óvanligir postar verða tiknir við (og korrigerað verður fyri skatti av hesum), so er vánaligasta úrslitið í tíðarskeiðinum eitt avkast á -12,4% (1999), meðan tað best árið vísti eitt eginpeningsavkast á 43,3% (1998). Eitt roknað miðaltal fyri tey 14 árini vísir eitt eginpeningsavkast á 22,5%, tá óvanligir postar ikki eru tiknir við. Hesi tøl benda á, at talan møguliga er um eina tilfeingisrentu hjá uppsjóvarflotanum.

Lat okkum til dømis siga, at ein tilfeingisskattur skuldi skatta tann partin av avkastinum, sum er realiseraður størri enn ein 20% av eginpeningsavkastinum. Verða teir óvanligu postarnir tiknir við í roknistykkið merkir

tað, at umleið ein triðingur av tí samlaða avlopinum eisini skal skattast við einum tilfeingisskatti. Verður tilfeingisskatturin ásettur á verða t.d. 10%, so vildi hetta síðani 1996 ført við sær ein tilfeingisskat á tilsamans umleið 35 mió. kr. ella umleið 2,5 mió. kr. um árið (tá verður gingið útfrá, at úrslitini eru javnt býtt millum øll skipini).

### Verksmiðjutrolararnir

Verksmiðjutrolararnir hava í árunum 1996 til 2009 verið millum 4 og 6 í tali, í miðal umleið 5 skip. Tilsamans hava skipini í hesum 14 ára tíðarskeiðinum fiskað fyri 3.960 mió. kr. Lønarútgjaldingarnar hava verið 1.548 mió. kr., og avlopið áðrenn skatt hevur verið 329 mió. kr. Av hesum úrsliti eru 54 mió. kr. útreiðsluførdar sum skattur, og gevur hetta ein nettovinning á 275 mió. kr. Um ársúrslitini hvørt ár verða roknaði í mun til eginpeningin við árslok sæst, at eginpeningsavkastið sveiggjar millum 35,8% tað besta árið (2000) og -7,0% tað vánaligast árið (2008). Verður roknað eitt einfalt miðal av avkastinum hvørt ár, fæst eitt miðal eginpeningsavkast á 14,3%. Hesi tøl benda ikki á, at tað er nøkur serlig tilfeingisrenta í rakstrarúrslitunum hjá verksmiðjutrolarunum.

### Allur fiskiflotin

Roknskapartølini fyri allan fiskiflotan vísa, at tað eru útreiðsluførdar 363 mió. kr. í skatti í øllum 14 ára tíðarskeiðinum frá 1996 til 2009, ella 26 mió. kr. um árið. Um vit hugsað okkum, at tað í hesum tíðarskeiði var ein tilfeingisskattur, og hesin hevði givið 25% av partafelagsskattinum, so vildi inntøkan av hesum verið umleið 90 mió. kr. fyri alt tíðarskeiðið, ella 6,5 mió. kr. um árið. Í sama tíðarskeiði eru samlaðu lønarútreiðslurnar 8.797 mió. kr., sum við einum miðal skatti á 40% vildi givið 3.519 mió. kr. í skattainntøkum – ella 10 ferðir so nógv sum í partafelagsskattinum.

Grundað á hetta taltilfar er ikki orsøk at vænta, at ein tilfeingisskatting í sær sjálvum vildi havt stóra ávirkan. Tann týdningarmesta uppgávan politiskt er at skipa soleiðis fyri, at umsitingin av fiskivinnuni kann tryggja, at fiskivinnan kann rekast meiri effektivt økonomiskt. Hetta hevði í sær sjálvum kunnað ført við sær størri íkast til føroyska búskapin, og hartil kundi hetta eisini ført við sær, at ein tilfeingisrenta kundi verið skapt, og harvið eisini eitt grundarlag fyri at skatta tilfeingisrentuna.

## 3.2. Sløg av tilfeingisskattum

Í einari og hvørjari vinnu, har talan er um avmarkaða atgongd til at brúka tilfeingið, sum samfelagið eigur, eru fleiri møguleikar at lata aktørar rinda fyri atgongdina. Hesir møguleikar eiga at viðgerast í mun til eina røð av kriterium.

Vit hava valt at síggja burtur frá møguleikanum, at gjald fyri luttøku í fiskivinnuni skal verða atferðs-regulerandi. Frammanundan er ein long røð av reguleringum í fiskivinnuni, og um ynski er, at skattaskipanin eisini skal vera atferðsregulerandi, so vil hetta krevja eina nágreiniligari lýsing, enn tað hevur verið gjørligt at gera í hesum arbeiðsskjali. Ein atferðsregulerandi skattaskipan kann lætt fáa óynsktar avleiðingar – t.d. kann nevnast at skipanin við Ráfiskagrunninum var ætlað sum ein prís- ella skattaskipan, sum við at áseta avrokningarprísin m.a. skuldi vera við til at regulera fiskivinnuna. Men sum kunnugt hevði hendan skipanin

við sær katastrofalar fylgir. Og jú fleiri hættir av reguleringum eru, jú truplari er tað at meta um, hvussu tann samlaða reguleringin virkar, og harvið verður eisini trupult at náa tey úrslit, sum ynskjast.

Av somu orsøk taka vit útgangsstøðið í, at ein nýggj tilfeingisskatting ikki skal virka atferðsregulerandi. Tað vil siga, at vit ganga út frá, at teir luttakarar, sum eru í fiskivinnuni í dag, virka soleiðis, at teir undir givnum korum royna at fáa sum mest burturúr fíggjarliga. Tað eru tí aðrir hættir at regulera fiskivinnuna, sum skulu royna at optimera tað samlaða fíggjarliga avkastið hjá fiskivinnuni.

Sum nevnt er tað grundleggjandi galdandi fyri skattaskipanir, at tær skulu verða einfaldar og hava gjøgnumskygni. Eisini umsitingarliga skulu skattaskipanir verða einfaldar og hartil skipaðar á slíkan hátt, at tær verða góðtiknar og mettar sum rímiligar.

## Yvirskotsgrundaður skattur

Yvirskotgrundaður skattur á tilfeingisrentuna fevnir bæði um vanligan partafelagsskatt og um ein serskatt, grundaður á peningastreym (cash-flow).

### Partafelagsskattur

Í mun til tey sløgini av skatting, sum nevnd eru niðanfyri, hevur partafelagsskatturin tann fyrimun, at hann er beinleiðis knýttur at úrslitinum hjá fyritøkuni. Fyritøkur, sum hava hall, verða ikki skattaðar, og skatturin vil veksa so hvørt, sum avlopið gerst størri.

Í samfelagnum er góðtikið, at vit øll skulu taka lut í at bera útreiðslurnar av at reka samfelagið. Inntøkuskattaskipanin verður sum skipan góðtikin. Kjakið um skattin snýr seg tískil serliga um, um skattastøðið kann góðtakast.

Við verandi støði á partafelagsskattinum er tað okkara fatan, at fyritøkur í dag góðtaka tann skatt, sum skal rindast, og ikki brúka óneyðuga orku uppá skattaspekulatiónir. Atferðin, t.d. íløgur, er ikki tengd at eini ætlan um at minka um skattin, men heldur at eina ætlan um at fáa best gjørligt fíggjarligt úrslit í mun til virksemið felagsins.

Ein møgulig tilfeingisrenta í fiskivinnuni vil verða skattað við verandi partafelagsskattaprosenti, og sostatt fær samfelagið longu í dag ein part av einari møguligari tilfeingisrentu. Men býtið av einari møguligari tilfeingisrentu millum vinnulívið og tað almenna, sum í dag verður gjørt umvegis partafelagsskattaprosentið, verður møguliga av tí almenna mett at verða órímligt.

Fyri árið 2011 er samtyktur tilfeingis-/loyvisskattur, sum førir við sær, at avlop, størri enn 1 mió. kr., verða skattað við 2,5% afturat verandi partafelagsskattaprosenti. Uppá stutt sikt er neyvan talan um eina skatting, sum er so stór, at hon førir við sær stórvegis broytta atferð hjá vinnuni. Um talan var um eina meira varandi skipan, hevði verið neyðugt at hugt nærri at, hvørjar óhepnar avleiðingar skipanin kundi havt yvir longri tíð.

Við einum partafelagsskatti, sum ikki longur er proportionalur, men progressivur, vil være ein eggjan til at brúka tann skattafyrimunin, sum liggur í botnmarkinum. Til dømis koma 4 eigarar av einum fiskiskipi í framtíðini at hava fyrimun av at eiga hvør sítt felag, sum so í felag reka fiskiskip og býta fíggjarliga avkastið.

Við einum vinningi á 5 mió. kr. vildi upprunaliga felagnum verið álagdur ein tilfeingisskatt upp á 2,5% av 4 mió. kr., ella 100.000 kr. Men verður felagið broytt, so verður vinningurin hjá hvørjum felagi 1,25 mió. kr. fyri hvørt av teimum 4 feløgunum, og tann samlaði tilfeingisskatturin verður so í staðin 2,5% av tilsamans 1 mió. kr., ella 25.000 kr. Jú hægri botnmarkið verður, og jú hægri skattaprosentið verður, jú meiri vil hetta eggjað til at brúka møguleikarnir í botnmarkinum fyri at minka um skattin.

Feløg, sum eru fevnd av tilfeingisskattinum, vilja eisini verða eggjað til at økja um kostnaðin fyri at minka um skattin. Hetta kann t.d. gerast við at gera skuldina í felagnum so stóra sum yvirhøvur gjørligt fyri á tann hátt fáa størst gjørligan rentukostnað. Eigur eitt holdingfelag felagið, er tað ein fyrimunur at luta út størst gjørligt vinningsbýtið, soleiðis at rentuinntøkurnar í holdingfelagnum bert skattast við vanligum skattasatsi, meðan rentuútreiðslurnar í felagnum kunnu dragast frá bæði í vanliga partafelagsskattinum og í tilfeingisskattinum.

Harumframt vilja tað eisini verða trupulleikar við at avmarka inntøkur og útreiðslur í mun til, um tær eru partur av grundarlagnum, sum skal skattast av tilfeingisskattinum ella ikki. Er t.d. talan um eitt samtak (koncern), verður felagið eggjað til, í tann mun tað er gjørligt, at flyta inntøkur út úr feløgunum, sum eru fevnd av tilfeingisskattinum, meðan so nógvar útreiðslur sum gjørligt verða fluttar til felagið at halda. Eitt reiðarí við inntøkum frá øðrum virksemi enn fiskivinnu vil kunna skilja burturúr hetta virksemið í eitt sjálvstøðugt felag. Men er talan um virksemi, sum gevur hall, so kann hetta eggja til, at virksemi, sum hevur hall, verður hildið í sama felagið, sum rekur fiskivinnu. Í feløgum, sum hava hendan møguleika, er tað sannlíkt, at orka fer at verða brúkt upp á hetta, samstundis sum tað er neyðugt hjá skattamyndugleikunum at brúka orku upp á at tryggja, at eitt rætt býti verður gjørt millum ymiskt virksemi hjá feløgunum.

**Skatting av peningastreymi (cash-flow skattur)**

Innan kolvetnisvirksemi er ein serligur tilfeingisskattur. Grundarlagið fyri hesum tilfeingisskatti er, at tað einstaka felagið skal rindað ein serskatt, tá talan er um ein óvanligan vinning. Skipanin er einføld, men krevur, at tilfeingisvirksemið verður avmarkað frá øðrum virksemi. Um ein slík skipan skal skipast fyri fiskivinnuna, so krevur tað eisini, at virksemið verður avmarkað, soleiðis at fiskivinnan antin verður avmarkað í einum sjálvstøðugum felag – atskilt frá øllum øðrum virksemi – ella at felagið hevur eina atskildað uppgerð fyri tað virksemið, sum er atknýtt fiskivinnuni.

Hóast tað ber til at loysa hesar avmarkingar umsitingarliga og í mun til eftirlit, so kann serskatturin á kolvetnisvirksemi ikki beinleiðis flytast yvir til fiskivinnuna. Serskattur innan kolvetnisvirksemi er ein skatting av tí óvanliga vinninginum. Hesin óvanligi vinningurin verður ásettur við einari ásettari renting av íløgunum. Skipanin hevur við sær, at tað hvørt ár verður gjørd ein serlig sjálvuppgáva, grundað á peningastreym. Í mun til vanligu sjálvuppgávuna verða íløgur frádrignar fult út í útveganarárinum, meðan rentuinntøkurnar og rentuútreiðslurnar ikki verða skrásettar í sjálvuppgávuni. Tá virksemið byrjar, verður natúrliga eitt hall, og hetta verður flutt fram sum frádráttur í uppgerðini árið eftir. Men áðrenn hallið verður flutt, so verður tað regulerað við einum faktori, sum vísir til vanliga vinningini. Verður vanligi vinningurin ásettur til at vera eitt eginpeningsavkast upp á 20%, merkir hetta, at hallið verður økt við 20% áðrenn tað verður flutt til skattauppgerðina árið eftir. Hetta verður so gjørt hvørt ár, og ikki fyrr enn tey samantaldu úrslitini eru positiv, fer ein skatting fram. Hendan skipanin tryggjar felagnum, at tað hevur fingið íløgurnar afturgoldnar og hartil fingið ein vanligan vinning, áðrenn serskatturin (tilfeingisskatturin) verður goldin.

Fyri nógv feløg í fiskivinnuni er galdandi, at teirra virksemið er byrjað fyri nógvum árum síðani, og tí verður tað ikki gjørligt at gera upp eina peningastreymsinntøku frá tí, at felagið byrjaði virksemið sítt.

Sum ein rein skattaskipan er lítil ivi um, at ein skipan líkari serskattaskipanini fyri kolvetnisvirksemi er tann mest effektivi skattaskipanin. Tað ber helst til at finna aðrar skattaskipanir, sum virka á nøkulunda sama hátt sum skatting av peningastreymi. Í broytingini í skattalógini, sum hevur ført við sær tilfeingis-/loyvisskatt fyri árið 2011, er fastsett eitt botnmark í vinningini á 1 mió. kr. áðrenn tilfeingisskatturin skal roknast. Hetta botnmarkið kann antin tulkast sum ein "vanligur vinningur", soleiðis at bert avlop størri enn hetta verða áløgd tilfeingisskatt. Ella kann hetta tulkast sum eitt "bagatell-mark", soleiðis at man umsitingarliga sleppur undan, at tað stóra talið av luttakarum í fiskivinnuni skal gera hesa serligu skattauppgerðina. Men eitt botnmark á 1 mió. kr. kann ikki tryggja, at tað bara fer fram ein skatting av tí óvanliga vinninginum. Støddin á "vanliga vinninginum" og "óvanliga vinninginum" er tengd at støddini hjá tí einstaka felagnum (eitt ella fleiri skip, minni ella størri skip) og at støddini á eginpeninginum hjá felagnum. Tað skal helst ikki vera ein fyrimunur at býta upp fyritøkuna í fleiri fyritøkur fyri at sleppa undan skattingini. Tað ber møguliga til at finna eina einfalda loysn, t.d. at botnmarkið fyri tilfeingisskattinum verður tengt at støddini á eginpeninginum: Jú hægri eginpeningur, jú størri skal avlopið vera fyri at tilfeingisskatturin verður kravdur. Ein slík skattaskipan kann sannlíkt skipast, men tá mugu skattamyndugleikarnir meira nágreiniliga áseta reglurnar, samstundis sum ein meting má gerast um hvørjir trupulleikarnir eru viðvíkjandi avmarkingum og umsiting av skipanini. Og sjálvsagt mugu inntøkurnar av einum slíkum skatti eisini setast í mun til tann kostnað, sum stendst av at reka skipanina.

## Uppboðssøla

Í sambandi við "Visjón 2015" arbeiði, ið varð sett ígongd av landsstýrinum, gjørdi strategibólkurin, sum viðgjørdi tilfeingi, hesar niðurstøðu um tilfeingisskatt:

> *"Í mong ár hevur ein týðandi liður í førda fiskivinnupolitikkinum verið at avmarka talið á fiskiloyvum, samstundis sum hesi áhaldandi hava verið lutað somu vinnufeløgum. Vansin við slíkari skipan er, at hon avmarkar atgongdina til vinnuna, soleiðis at nýtt fólk hevur ilt við at sleppa framat. Tá ið samanum kemur, verður úrslitið, at eigarar kunnu verða "vardir", so at tann støðuga tillagingin, ið hevur við sær lækkandi kostnað, gongur seint ella í versta føri steðgar upp. Framtíðar fiskivinnulóggávan skal byrgja fyri hesa støðu, so at lættari verður hjá øllum at sleppa fram at fiskirættindinum. Hetta verður gjørt við at selja fiskirættindi regluliga og við at skipa sølurnar soleiðis, at ognarrætturin varir bert á ávísa tíð. Í hesum máli er sera týdningarmikið at finna eina jávnvág millum frælsa atgongd og møguleika hjá vinnuni at gera langtíðarætlanir. Eitt ítøkiligt dømi um slíkt uppskot kundi verið, at rættindi verða latin eitt ávíst áramál í senn, men at ein ávísur partur av hesum rættindum skal verða latin landinum aftur hvørt ár. Landið setur síðan henda sama partin til sølu, og hann kann keypast an antin teimum somu, sum lótu hann inn, ella av øðrum. Hetta merkir, at skal eitt felag halda síni rættindi viðlíka, verður neyðugt at keypa øll rættindini leypandi. Inntøkan av hesum handli er tilfeingisgjaldið til landið."*

Í viðmerkingunum til Løgtingslóg nr. 133 frá 28. Desember 2010 um broyting í Skattalógini (viðv. tilfeingis-/loyvisskatti) stendur:

> *"Við hesum verður lagt fram uppskot um at áleggja tilfeingisskatt á inntøkur, sum stava frá virksemi í fiskivinnu og alivinnu. Við hesum verður sostatt týdningarmikil partur av ætlanini at breiðka skattagrundarlagið í verk.*

*Orsøkin til at áleggja slíkan tilfeingisskatt er, at atgongdin til hesar vinnur er avmarkað av tí almenna. Fyri fiskivinnu er hetta tí, at ynskt verður at avmarka veiðutrýstið og fyri alivinnu tí at bara ávíst tal av firðum eru, ið loyvir kunnu latast at ala í. Fyri alivinnu verður sostatt í hesum høpi hugsað um firðir sum tað avmarkaða tilfeingi.*

*Hesar avmarkingar geva møguleika til meirinntøku til tey, sum loyvini hava fingið, útyvir tað, sum til ber í vinnum, har atgongdin ikki á slíkan hátt er avmarkað. Tað verður ti mett rímiligt, at tey rinda part av sínum seryvirskoti til tað almenna.*

***Um tilfeingisrentu***

*Tilfeingisrenta er seravkast av náttúruríkidømi. Tilfeingisrentan verður til, tí at atgongdin at virka í eini vinnu er avmarkað av náttúruviðurskiftum og/ella av reguleringum.*

*Hvussu stór tilfeingisrentan er tey einstøku árini, veldst um konjunkturir, biologisk viðurskifti og veiðutrýst. Tilfeingisrentan er sostatt ikki jøvn ár fyri ár, men skiftir eftir gongdini í tilfeingisvinnunum, og kann vera ymisk frá tilfeingisvinnu til tilfeingisvinnu.*

*Við tilfeingisskatti verður skattur lagdur á tilfeingisrentuna.*

***Skipan av tilfeingisskattinum***

*Tvey grundleggjandi skattaamboð at krevja inn gjaldið eru skotin upp í Visjón 2015, yvirskotsskattur og almenn uppboðssøla. Av hesum var yvirskotsskattur roknaður sum betra skattamboðið, og heildarleisturin í hesum lógarskoti verður tí mettur at vera í samsvari við skattapolitiska málsetningin, ið settur varð í Visjón 2015."*

Sostatt verða í omanfyrinvendu viðmerkingum umrøddir tveir hættir at krevja inn tilfeingisrentuna, nevniliga ein skatting av avlopinum ella umvegis eina uppboðssølu. Í frágreiðingini frá Visjón 2015 bólkinum, ið viðgjørdi tilfeingi, verður mælt til eina uppboðssølu. Grundgevingin er tó ikki, at endamálið við uppboðssøluni er at krevja inn tilfeingisskatt, men heldur sum eitt amboð at skipa fiskivinnuna við. Tískil kann, sum í viðmerkingunum í frágreiðingini frá Visjón 2015 bólkinum og í viðmerkingunum til lógina um tilfeingisskatt, grundgevast fyri, at ein skipan við uppboðssølu meira er at rokna sum ein skipan at regulera fiskivinnuna við, heldur enn eitt amboð at taka inn tilfeingisskatt. Hetta merkir, at um so er, at ein skipan við uppboðssølu skal setast í verk fyri alla fiskivinnuna, krevur hetta eina meira grundleggjandi viðgerð av, hvussu fiskivinnan skal skipast framyvir.

Fyrimunir og vansar við eini uppboðssølu eiga tískil ikki einans at vera mettir eftir hvussu skipanin virkar sum ein skattaskipan, men eisini eftir hvussu hon riggar sum ein skipan, ið skal betra um effektivitetin í fiskivinnuni. Um so er, at ein skattaskipan skal setast í verk við støði í verandi skipan av fiskivinnuni. vil ein uppboðssøla tískil ikki vera ein optimal loysn. Hóast hetta vilja vit knýta nakrar viðmerkingar til uppboðssøluskipanir generelt og hvussu hesar kunnu roknast sum ein tilfeingisskattur.

Tað eru fleiri orsøkir til, at ein uppboðssøla ikki er besta loysnin at krevja inn tilfeingisskatt:

- Ein tilfeingisskattur eigur at verða knýttur at, hvussu stór tilfeingisrentan er, t.e. tað skal helst vera samanhangur millum støddina á tilfeingisrentuni og á tilfeingisskattinum. Tá reiðaríini/fiskimaðurin bjóðar uppá rættin at fiska, ger hann tað við tí vitan hann hevur, áðrenn hann fer út at fiska. Hetta kann føra til, at støddin á tilfeingisrentuni verður yvirmett, kanska tí fiskimaðurin hevur ov bjartar

vánir til framtíðina. Á sama hátt kann ein undirmeting av tilfeingisrentuni føra til, at tilfeingisskatturin verður ov lágur

- Fíggjarliga sterk reiðarí/fiskimenn hava møguleika at bjóða hægri enn aðrir fyri á tann hátt at halda øðrum úti. Hetta kann føra til monopolisering av marknaðinum
- Reiðarí/fiskimenn skulu rinda skattin av tilfeingisrentuni frammanundan (allir annar skattur skal rindast afturút). Sostatt bera reiðaríini/fiskimenn allan váðan
- Íløgur í skip kunnu verða meira óvissar, tí tað ikki er vist, at man vinnur uppboðið, og trupult kann tí verða at fáa fígging

Hinvegin eru eisini fleiri fyrimuni við eini uppboðssøluskipan (eisini skattliga):

- Um skipanin virkar optimalt, kann hon tryggja landskassanum alla tilfeingisrentuna
- Skipanin kann tryggja eitt rættvíst býti av tilfeinginum
- Mest effektivu reiðarí/fiskimenn kunnu fáa rættin at fiska

Um so er, at ein uppboðssøla skal virka, eru ávísar fortreytir, sum skulu vera tilstaðar:

- Forðast má fyri, at keyparar verða miðsavnaðir. Um so er, at ov fáir keyparar eru, vil uppboðssølan ikki rigga, og vandi er fyri, at tilfeingisskatturin verður ov lágur, samstundis sum vandi er fyri, at vinnan gerst minni effektiv.
- Tað, sum verður bjóðað út, skal hóska til tað, sum keyparar eru til. Hædd skal takast fyri, at ymsu bólkarnir ikki kunnu bjóða upp á tað sama, tað vil siga at hædd má takast fyri: Reiðskapi, stødd á kvotu, nøgd av fiskidøgum, slag av fiski, landingarstað, stødd á fiskifari o.s.fr.
- Uppboðssølumarknaðurin má virka væl. Eitt nú má vera nøktandi tal av óheftum keyparum og seljarum.

## Umsetnings- og nøgdargrundaður skattur

Umsetnings- og nøgdargrundaður skattur fevnir t.d. um avgjald á tilfarsnýtslu og um avgjøld á veiðuvirði og –nøgd.

### Avgjald á tilfarsnýtslu

Kjak hevur verið um í hvønn mun eitt gjald fyri nýtslu av tilfeinginum hjá samfelagnum kann fara fram umvegis skatting av tilfarsnýtslu. Hetta kann t.d. gerast við avgjøldum á brennievni, reiðskap ella á lønir.

Ein slíkur háttur at skatta hevur eina atferðsregulerandi ávirkan. Við avgjøldum á reiðskap vil fiskivinnan sannlíkt verða skipað øðrvísi enn í einari støðu uttan avgjøld. Somu viðurskifti eru galdandi fyri avgjøld á brennievni ella á lønir. Í hesum sambandi kann ein skatting av tilfarsnýtslu hava við sær, at broyting hendir í framleiðsluni, sum er óhóskandi sæð í einum effektivitetssjórnarhorni. Skattingin førir eisini við sær, at ein luttakari við vánaligum úrsliti vil gevast við virkseminum fyrr, enn hann annars hevði gjørt.

Skatting av tilfarsnýtslu er ikki bara ein ástøðilig skatting, men eru tað dømi um tað í fleiri vinnum, fyri t.d. bankar, tryggingarfeløg, læknar er eitt avgjald, lønarhæddaravgjald, í mun til útgoldna løn. Avgjaldið skapar

inntøkur til tað almenna, og er partur av fíggingini av vælferðini í samfelagnum, men avgjaldið hevur sjálvsagt eitt lágt "pínumark": Er gjaldið ov høgt, eggjar hetta til eina sparing av lønarútreiðslunum og harvið eina minking í arbeiðsplássum.

Ein slík skattaskipanin kann møguliga skipast á einfaldan hátt, men hugsandi er, at tað verða fleiri møguleikar at sleppa undan skattingini, og hetta ger tað truplari at skapa skipanina. Eisini er tað trupult at fáa undirtøku fyri slíkum skipanum, tí tað er trupult at grundgeva fyri, hví skattingin er rímilig. Slíkar skipanir eru heldur ikki vælegnaðar til at krevja inn ein rímiligan part av einari tilfeingisrentu til samfelagið.

**Avgjøld á veiðuvirði ella –nøgd**

Ein ofta nevndur háttur at skatta tilfeingisvinnur er at leggja eitt avgjald á veiðuvirði ella -nøgd, í summum førum verður hetta nevnt eitt landingaravgjald.

Aftur her er talan um eina skatting, sum er illa egnað til at tryggja samfelagnum ein rímiligan part av einari møguligari tilfeingisrentu. Skattingin verður einans grundað á inntøkurnar, uttan at taka hædd fyri kostnaðinum, sum skal til fyri at tryggja hesar inntøkur. Skattingin vil sostatt ikki taka hædd fyri, um tann einstaki luttakarin í vinnuni hevur eitt rakstraravlop ella eitt rakstrarhall. Skattingin er bert tengd at inntøkusíðuni og vil tí sjálvsagt økjast, tá veiðunøgdirar eru stórar og prísurin á fiski er høgur, men skattingin vil hinvegin ikki ávirkast av, um tað verður dýrari ella bíligari at fiska.

Uppá stutt sikt vil ein skatting av hesum slagi neyvan vera atferðsregulerandi, men hon vil tó hava við sær, at ein luttakari við vánaligum úrsliti vil gevast við virkseminum fyrr, enn hann annars hevði gjørt.

Skipanin hevði kunnað verið góðtikin av vinnuni, um so var, at talan var um eitt lítið avgjald, og um hetta avgjaldið hevði ført við sær, at vinnan slapp undan øðrum avgjøldum, sum høvdu ført við sær harðari skatting.

Í einari støðu, har tað eru stór avlop í fiskivinnuni, hevði ein skatting av hesum slagi neyvan verið góðtikin í samfelagnum. Uttan mun til, um skattingin í útgangsstøði hevur til endamáls at vera føst og støðug, so kann tað almenna verða eggjað til at økja um skattingina, tá úrslitini í fiskivinnuni gerast betri. Men um ætlanin við skattingini er, at ein størri partur av tilfeingisrentuni, tá hon verður skapt, skal fella aftur til samfelagið, so er ein yvirskotsgrundaður skattur eitt betri amboð.

## Fastur skattur

Tá fiskivinnan verður rikin út frá tillutaðum fiskiloyvum, kann ásetast eitt fast árligt gjald fyri hesi loyvi. Gjaldið kann lagast eftir hvat slagi av loyvi talan er um, og gjaldið kann eisini broytast frá einum ári til annað, men eigur hóast hetta vera støðugt. Ein variantur av slíkari skatting kann vera eitt gjald, sum verður ásett í mun til talið av fiskidøgum, sum loyvi fevnir um. Fyrimunurin við einari slíkari skipan er, at hon er sera einføld at umsita.

Luttakarar í fiskivinnunu kunnu helst góðtaka eina slíka skatting um so er, at talan er um eitt lítið gjald: Fyrst og fremst tí, at tá vildi gjaldið havt lítla ávirkan á rakstrarúrslitið, og harnæst tí at hetta gjald vildi legitimerað rættin hjá teimum til at troyta tilfeingið, sum samfelagið eigur. Hugsandi er, at ein slík skipan

eisini hevði verið góðtikin av vinnuni, tí hon kann metast verða frægasta loysnin í mun til nógvar aðrar møguleikar. Um ein slík skipan hevði verið góðtikin uttanfyri vinnuna er tengt at, um gjaldið verður mett at vera nóg høgt. Eru fíggjarligu úrslitini hjá fiskivinnuni vánalig, hevur samfelagið lítlar trupulleikar við at góðtaka eitt lágt gjald, men krøv vilja helst koma um størri gjald, um/tá fiskivinnan megnar at skapa stór fíggjarlig avlop.

Ein slík skattingarskipan er ikki góð, um ætlanin er, at goldið skal verða í mun til tað fíggjarliga avkastið hjá vinnuni. Tá er talan um eitt amboð, sum kann kennast sum eitt sjálvtøkuborð hjá myndugleikunum. Um ætlanin er at skatta eitt avlop, so er skattingin skiftandi í mun til støddina á avlopinum, og tá er meiri hóskandi at brúka tað "rætta" amboðið, nevniliga tann vanliga yvirskotsgrundaða skattin.

Eitt fast gjald fyri loyvini kann í prinsippinum hava við sær, at ein fyritøka, sum hevur hall av virkseminum, verður skattað. Í slíkum føri skal gjaldið verða rættiliga lítið, um tað skal verða góðtikið sum rímiligt. Við einum størri gjaldi kann úrslitið verða, at ein luttakari í vinnuni má gevast í vinnuni áðrenn tað annars hevði hent, og tá hevur skattingin kortini havt við sær atferðsregulerandi ávirkan.

Um tað í fiskivinnun er ella verður ein tilfeingisrenta, so vil eitt fast gjald fyri atgongdina at fiska lætt kunna verða mett sum eitt ov lítið gjald fyri atgongdina til at virka í fiskivinnuni og skapa ein óvanligan vinning. Talan er sostatt um eina skipan, sum ikki er vælegnað til at lata vinnuna gjalda ein rímiligan part av einari møguligar tilfeingisrentu aftur til samfelagið.

## 4. Tilfeingisgjøld í øðrum londum

Hóast skatting av tilfeingisrentuni í fleiri áratíggju hevur verið partur av kjakinum í samband við umsiting av fiskivinnuni, so eru tó ikki so nógv dømi um, at skatting av tilfeingisrentuni er skipað í sínum reina formi (eins og nevnt í partinum omanfyri). Tað eru tó nógv dømi um, at fiskivinnan kring heimin rindar ávíst avgjald fyri at fáa møguleikan at troyta fiskatilfeingi. Onkursvegna er hetta ein skatting av tilfeingisrentuni, tó at hendan skatting ikki er beinleiðis knýtt at, um vinnan megnar at skapa tilfeingisrentuna (tann óvanliga vinningin).

### 4.1. Ísland

Í Íslandi var í 2004 sett í verk ein skipan við tilfeingisgjaldi – nevnt *veiðigjald* – við tí fyri eyga, at landskassin skuldi fáa ein part av tilfeingisrentuni. Harumframt skuldi tilfeingisskatturin eisini hava við sær, at TAC-skipanin í Íslandi fekk størri undirtøku millum íslendingar (Árni M. Mathiesen, táverandi fiskivinnu- og landbúnaðarmálaráðharri, røða í Hull, okt. 2002).

Íslendska tilfeingisgjaldið tekur støðið í, at eitt avgjald verður lagt á landingarvirðið, har ávísar útreiðslur, t.d. lønir, olja og aðrar rakstrarútreiðslur, tó eru drignar frá. Skipanin var sett í verk í 2004, tá við einum avgjaldi upp á 6%, men var tað tó frá byrjan avgjørt, at avgjaldið so líðandi skuldi hækka til 9,5% í 2009.

Støddin á tilfeingisgjaldinum er grundað á landingarvirðið. Tekniskt er skipanin grundað á toska-ekvivalentar, har tilfeingisgjald fyri hvørt kilo er ásett fyri tosk fyri eitt fiskiár hvørja ferð (fiskiárið gongur, sum í Føroyum, frá september til august), og so verður ein umrokning gjørd til onnur fiskasløg, út frá virðinum, sum fiskasløgini hava í mun til tosk.

Fyri fiskiárið 2010/2011 er tilfeingisgjaldið roknað til 6,44 íslendskar kr. fyri hvørt kilo av toski (ella umleið 30 oyri fyri hvørt kilo í okkara krónum[1] (Reglugerð um veiðigjald og þorskígildi fiskveiðiárið 2010/2011, www.reglugerd.is). Mett er, at íslendska fiskivinnan fyri fiskiárið 2010/2011 fer at rinda umleið 3 milliardir íslendskar kr. Umroknað til okkara gjaldoyra svarar hetta til umleið 140 mió. kr. í tilfeingisgjaldi (Visir, 1. Feb. 2011, www.visir.is).

### 4.2. Grønland

Í Grønlandi hevur seinastu árini verið arbeitt við at gera broytingar í fiskivinnuumsitingini, og í 2008 setti grønlendska landsstýrið nevnd at arbeiða við dagføring av fiskivinnulóggávuni. Nevndin kom við frágreiðing síni í februar 2009 undir heitinum *"Fiskerikommisionens betænkning"*. Ein av orsøkunum til, at farið var undir hetta arbeiðið, var eitt politiskt ynski um betri lønsemi í fiskivinnuni og størri avkast til samfelagið í síni heild.

Arbeiðið hjá nevndini fevndi eisini um eina lýsing av spurningum viðv. *"betaling for adgang til ressourcerne"*, har m.a. fokus er sett á (Fiskerikommisionens betænkning, 2009):

*"Betaling for adgang til ressourcen*

[1] 100 íslendskar kr. hava eitt virði á umleið 4,65 danskar kr.

- *Belyse de økonomiske konsekvenser af indførelse af en bredere ressourcerenteafgift i stedet for eller parallel med den nuværende rejeafgift.*
- *Belyse de økonomiske konsekvenser af en brugerbetaling, således at erhvervet betaler for de udgifter som Grønland har af fiskerierhvervet og ikke Landskassen.*
- *Belyse rammer og forudsætninger for et eventuelt auktionssystem med henblik på at sikre*
    - *en ressourcerenteafgift eller en brugerbetaling ved Hjemmestyrets salg af kvoter (money-up-front system).*
    - *markedsvilkår ved handel med individuelle og omsættelige kvoteandele/årskvote."*

Í 2010 varð uppskot um nýggja fiskivinnulóg lagt fyri Landstingið. Í uppskotinum er eisini heimild fyri at krevja inn brúkaragjald í sambandi við, at fiskiloyvi verða latin, og brúkaragjald til at rinda fyri nakrar av útreiðslunum í sambandi við umsiting av fiskivinnuni. Lógin er tó ikki broytt enn, tí lógaruppskotið varð tikið aftur í heyst eftir mótmæli frá m.ø. vinnuni.

So hóast ætlanir eru um at fara undir eina skipan við tilfeingisgjøldum á tilfeingisrentuna í Grønlandi, so eru hesar ætlaninar ikki settar í verk enn.

**Rækjuavgjald og ES-gjald fyri fiskirættindi**

Í grønlendsku fiskivinnuni eru í dag tvey gjøld, sum fella til grønlendska landskassan: Rækjuavgjaldið og eitt gjald frá ES fyri rættindi at fiska undir Grønlandi.

Rækjuavgjaldið er eitt gjald, sum er álagt tí partinum av rækjuveiðini, sum ikki verður landaður í Grønlandi við tí fyri eyga at virka rækjurnar á grønlendskum virkjum. Við øðrum orðum rindað tey skipini, sum framleiða rækjur umborð, eitt avgjald til landskassan. Tilsamans fiskar hesin parturin av rækjuflotanum í Grønlandi umleið 75.000 tons og verða 75% av veiðuni virkað umborð og útflutt beinleiðis til marknaðin í Evropa og Japan (Grønlands fiskeriforvaltning og dets konsekvenser for økonomien, med fokus på rejefiskeri: Paralleller til andr forvaltningssystemer, 2010)

Avgjaldið verður roknað út frá rækjuprísinum, har hægri kiloprísur hevur við sær størri prosentvíst avgjald. Í tíðarskeiðinum frá 1999 til 2008 gav rækjuavgjaldið 97,8 mió. kr. til grønlendska landskassan. Í 2008 var rækjuavgjaldið 6,2 mió. kr., hetta árið var útflutningsvirði á rækjunum 1.043 mió. kr. (Forvaltningsplan for rejefiskeriet i Vestgrønland, 2010). Í 2008 var avlopið hjá teimum seks reiðaríunum, sum rækjuavgjaldið rakar, 81 mió. kr. eftir skatt, og rækjuavgjaldið hevur lítlan týdning í mun til samlaðu inntøkurnar hjá grønlendska landskassanum.

Umframt inntøkur frá rækjuavgjaldinum fær Grønland eisini eitt endurgjald frá ES í samband við fiskirættindi í grønlendskum sjógvi. Avtalan millum Grønland og ES varð gjørd í 1985, tá ið Grønland fór burtur úr ES. Avtalan hevur verið gjørd fyri eitt 6 ára skeið og verandi avtala, sum gongur frá 2007 til 2012, gevur grønlendska landskassanum umleið 320 mió. kr. í inntøku. Fyri gjaldið fær ES kvotur av m.a. toski, rækjum, kongafiski, svartkalva og krabba (Fiskeripartnerskabsaftalen mellem EU og Grønland, 2006).

Samanumtikið kann sigast, at tað í dag ikki er álagt grønlendsku fiskivinnuni nakað veruligt tilfeingisgjald. Tó so er ein partur av rækjuflotanum álagdur eitt avmarkað avgjald, og harumframt fær Grønland endurgjald

fyri latin fiskirættindi til ES. Hinvegin eru ætlanir um at gera broytingar í umsitingini av grønlendsku fiskivinnuni, har tilfeingisgjald eisini er partur av kjakinum.

## 4.3. Norra

Norra er ríkt upp á náttúrutilfeingi og hevur eisini í stóran mun megnað at skapa vinnuvegir burturúr hesum tilfeingi, bæði innan olju og gass, vatnorku, skóg, mineral og fiskivinnu. Innan ávísar av hesum vinnum eru skipanir, sum tryggja, at ein partur av tilfeingisrentuni fellur aftur til statskassan.

Innan olju- og gassvirksemi og vatnorkuvirksemi eru skattareglur – eitt tilfeingisgjald – sum hava við sær, at partar av tilfeingisrentuni fellur aftur til samfelagið. Olju- og gassvinnan er í 2011 áløgd 28% í partafelagsskatti og 50% í serskatti, sum er at rokna sum ein tilfeingisskattur, meðan vatnorkuvinnan rindar 28% í partafelagsskatti og 27% í tilfeingisgjaldi/-skatti (Statsbudsjettet 2011, kap. 2.2.3. Bedriftsbeskatning).

Tað eru eingi beinleiðis tilfeingisgjøld á norsku fiskivinnuna, eins og vit kenna tað frá t.d. Íslandi ella Grønlandi. Men fiskivinnan í Norra er tó avmarkað av skipanum líkum teimum, vit hava í Føroyum, við m.ø. landingarskyldu. Í Norra verður stórur dentur lagdur á, at kyst-Norge fær so stóran ágóða av fiskivinnuni sum til ber. Í hesum sambandi verður landingarskyldan mett sum ein møguleiki at skapa økt virksemi í kyst-Norge.

## 4.4. Kili

Stjórnin í Kili umhugsar í løtuni at skipa fiskiskapin eftir pelagisku fiskasløgunum sum eina uppboðssølu. Tað eru í dag einans 5-7 reiðarí, sum hava rættindi at fiska pelagisku fiskasløgini. Teirra kvotusáttmálar ganga út í 2012, og kappingarmyndugleikarnir í Kili hava mælt til, at fiskiskapurin tá verður skipaður sum ein uppboðssøla.

Torbjørn Trondsen frá Universitetinum í Tromsø er við í hesum arbeiði[2]. Hann grundgevur fyri, at við at skipa uppboðssøluna á ein hóskandi hátt, kunnu fyrimunirnir við eini uppboðssølu verða størri enn vansarnir. Millum annað mælir hann til:

- Kvotur og fiskidagar skulu lutast út árliga. Hetta nevnir hann Individual Seasonal Quotas (ISQ) og Individual Seasonal Catchingdays (ISD).
- Tilfeingisgjaldið skal rindast aftaná heldur enn frammanundan, t.e. tá vinningurin/ tilfeingisrentan er staðfest. Á henda hátt kann ein peningasterkur keypari ikki bjóða ein peningaveikan út.
- Tað skal bera til at selja keypt rættindi aftur eftir einum ávísum leisti. Hetta minkar um óvissuna hjá keypara og tryggjar, at øll tilfeingisrentan kemur til høldar. Fyri at tryggja, at eingin keypir inn undir seg, skal afturgjaldsprísurin minka við tíðini (hevur virðið 0 tá fiskidagaárið er úti).

---

[2] Torbjørn Trondsen (2010): "Fish Quota Auction Opportunities for Chile 2010", http://triton.nfh.uit.no:86/Forskning/Kvoteforvatning/Torbjorn_Trondsen_Fish%20Quota%20Auction%20report_%20end.pdf

- Fyri at fáa veiðiloyvi skal tann vinnurekandi góðkennast av myndugleikanum. Einans tey, ið hava veiðiloyvi, kunnu bjóða upp á rættindi og fáa fiskiloyvi. Veiðloyvi kunnu gevast til ávís fiskasløg, ávís øki ella annað.
- Fíggjarliga óvissan við eini uppboðssølu kann t.d. minkast við at hava ymisk tíðarskeið á rættindunum. Sostatt kann eitt reiðarí hava rættindi til onkran fiskiskap í langa tíð og t.d. eitt ára rættindi til annan fiskiskap.
- Mælt verður til, at skiftið frá verandi skipan til uppboðssøluskipan verður gjørt stigvíst, t.d. við eini hækking við 5% um árið í 10 ár, soleiðis at helvtin av rættindunum vera á uppboði aftaná 10 ár. Á henda hátt kann vinnan laga seg til nýggju kappingarumstøðurnar.
- Fyri at verja móti monopolisering kann mark setast á, hvussu nógv rættindi eitt ávíst reiðarí kann hava.

## 4.5. Estland

Tá Estland var ein partur av Sovjatsamveldinum varð fiskiskapurin skipaður sum planbúskapur. Estland fekk sítt frælsið í 1991 og gongd varð tá sett á at fáa marknaðarbúskapin at rigga. Í 2001 varð skipan sett í verk við umsetiligum eginkvotum, sokallað ITQ (Individual Transferable Quotas). Kvoturnar vórðu seldar á uppboðssølu. Uppboðssølan var tó einans virkin í árunum 2001, 2002 og 2003. Í 2004 fór Estland inn í ES og tá var aftur farið yvir til at býta loyvini eftir søguligum rættindum.

Kvotaskipanin virkaði soleiðis, at 90% varð býtt eftir søguligum rættindum og 10% varð selt á uppboðssølu. Uppboðssølan gjørdi, at avlopið hjá vinnuni minkaði og tað endaði við at vinnan í 2003 ikki longur vildi bjoða uppá kvoturnar. Um hetta mundi var Estland á veg inn í ES og vinnan grundgav við at teirra umstøður vóru munandi verri enn tær hjá vinnuni innanfyri EU. Samanumtikið førdi hetta til at kvotaskipanin varð tikin av aftur.

Røgnvaldur Hannesson og fleiri hava í 2005 kanna eftir hvussu upbboðssølan ávirkaði fiskiflotan:

- Yvirkapaciteturin í vinnuni minkaði. Serstakliga rakti hetta smærri skipini, sum fóru út úr vinnuni
- Tey mest effektivu skipini fingu størru kvotur
- Fiskirættindini endaðu á færri hondum
- Uppboðssølan fekk vinnuna at samstarva
- Royndirnar úr Estalandi vístu, at tað er sera trupult at stovna og varðveita eina uppboðssøluskipan
- Skipanin møtir stóra mótstøðu frá vinnuni

# 5. Tilfeingisgjaldið í landskassan, í grunn/strukturgrunn ella annað

Hesin parturin viðger, hvussu inntøkurnar av einum tilfeingisgjaldi skulu nýtast. Sambært arbeiðssetninginum skal viðgerðin fevna um:

- Tilfeingisgjaldið fer í landskassan sum vanligur skattur
- Tilfeingisgjaldið fer í serskildan grunn, sum verður nýttur til tillagingar av vinnuni, m.a. við atliti at bygnaði og øðrum
- Aðrir møguleikar

## 5.1. Alment um skattahugtakið

Skattur sum hugtak er ikki alment allýstur, men verður vanliga mettur at fevna um gjald til tað almenna, sum tann einstaki hevur skyldu til at rinda, uttan at hetta gjald er at meta sum viðurgjald fyri samsvarandi ella líknandi veiting frá tí almenna til tann einstaka. Skattur sum hugtak fevnir bæði um beinleiðis skatt og óbeinleiðis skatt. *Avgjøld og gjøld* annars, sum tað almenna krevur fyri beinleiðis tænastur, eru ikki fevnd av skattahugtakinum, av tí at hesi ikki lúka treytirnar fyri at vera ein skattur.

*Beinleiðis skattur* er eyðkendur á tann hátt, at skattakravið verður gjørt upp og kravt frá teimum skattasubjektum, sum skulu bera ta endaligu fíggjarligu byrðuna, t.d. inntøkuskattur. Beinleiðis skattur verður sum heild rindaður beinleiðis í landskassan.

*Óbeinleiðis skattur* er eyðkendur á tann hátt, at skattakravið verður gjørt upp og kravt frá øðrum enn teimum skattasubjektum, sum skulu bera ta endaligu fíggjarligu byrðuna, t.d. mvg, tollur, punktgjøld o.t. Fyri óbeinleiðis skatt er eisini galdandi, at hesin fer í landskassan.

Fyri *avgjøld og gjøld*, sum tað almenna tekur fyri at veita eina tænastu, er galdandi, at avgjaldið skal svara til kostnaðin av at veita nevndu tænastu. Dømi um slík avgjøld er t.d. tað gjald, sum almennir stovnar krevja frá vinnufyritøkum fyri at hava eitt ávíst lógarásett eftirlit, t.d. heilsufrøðiligt eftirlit við matvøruframleiðslu o.tíl. Hesi gjøld verða nýtt til at veita tær tænastur, tey eru rindaði fyri.

Niðanfyri eru ymsu møguleikarnir stutt umrøddir í mun til, um inntøkur frá einum tilfeingisgjaldi skulu fara í landskassan ella í serskildan grunn.

## 5.2. Tilfeingisgjaldið í serskildan grunn

Ein annar møguleiki er, at tilfeingisgjaldið verður rindað í serskildan grunn, sum verður nýttur til t.d. tillagingar av vinnuni, m.a. við atliti til bygnað og annað.

### Alment um grunnar

Søguliga eru og hava verið nógvir grunnar í Føroyum. Flestu av hesum grunnum vóru upprunaliga skipaðir sum grunnar beinleiðis undir Løgtinginum.

Seinastu umleið 20 árini hevur verið gjørt eitt miðvíst arbeiði fyri at tryggja, at alt búskaparligt virksemi hjá landinum er avspeglað í løgtingsfíggjarlógini og í landsroknskapinum. Í 1992 vóru 67 landsgrunnar tiknir av, og í 1997 vórðu aðrir 15 landsgrunnar tiknar av. Talið av almennum grunnum er í dag umleið 30.

Ein av høvuðsorsøkunum til at skipa ávíst virksemi í einum grunni er ásetingin í játtanarskipanini um, at givna játtanin er heimild at ráða yvir játtanini í tí fíggjarári, sum hon er givin. Hetta kann í avísum førum forða fyri einari skilagóðari nýtslu og einum skilagóðum rakstri, av tí at játtin skal brúkast í tí fíggjarári, sum hon er givin.

Ein onnur av høvuðsorsøkunum at skipa ávíst virksemi í einum grunni er, at mett verður, *"at tað fyri ávísar landsuppgávur er best, um landsstýrið ikki hevur beinleiðis ávirkan"* (Álit um landsstovnar og grunnar, 2001)[3].

### Um bygnaðargrunn

Vísandi til tað, sum omanfyri er skrivað um landsgrunnar og sambandið millum landsgrunnar øðrumegin og løgtingsfíggjarlóg og landsroknskap hinumegin, verður mett, at inntøkan av einum tilfeingisgjaldi eigur ikki at verða rindað í ein serligan grunn at nýta til ávís endamál.

Í fyrstu atløgu er hetta í andsøgn við tað arbeiðið, sum hevur verið framt seinastu 20 árini og í aðru atløgu verður mett, at hetta er ein óheppin háttur at stýra einari ávísari vinnu. Henda seinna meting er grundað á, at ein ov neyv politisk stýring av einari vinnu, sum átti at verið stýrd av vinnuligum atlitum, kann hava óhepnar avleiðingar við sær, m.a. við atliti til natúrliga frágongd og natúrliga tillaging av virkseminum, sum verður rikið.

At enda verður viðmerkt, at henda meting eisini er grundað á, at tað er ein politisk avgerð, hvørt ein ávís vinna eigur at verða stuðlað fram um aðrar vinnur. Tað er sostatt fatan arbeiðsbólksins, at politiski myndugleikin – um hesin vil stuðla fiskivinnuni á serligan hátt – eigur at gera hetta við beinleiðis játtanum á løgtingsfíggjarlógini. Á henda hátt ber eisini til í størri mun at tryggja gjøgnumskygni í stuðulsskipanunum.

## 5.3. Aðrir møguleikar

Bólkurin hevur í stuttum umrøtt aðrar møguleikar at nýta tilfeingisgjaldið, men metir samanumtikið, at tað mest reella er at halda seg til einans at viðgera annaðhvørt at gjaldið fer beinleiðis í landskassan á § 20 á fíggjarlógini, ella at gjaldið fer í serligan grunn, sum t.d. kann verða nýttur til tillagingar í vinnuni.

Skulu aðrar skipanir setast í verk er neyðugt við einum meira gjølligum og drúgførum arbeiði, helst í samráði við vinnuna, og tíð hevur ikki verið til tess.

[3]Álit um landsstovnar og grunnar. Tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti. Fíggjarmálaráðið november 2001.

## 5.4. Tilfeingisgjaldið fer í landskassan sum vanligur skattur

Verður tilfeingisgjaldið ikki eitt beinleiðis gjald fyri eina ávísa tænastu, eigur tað at fara í landskassan eins og vanligur skattur.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er ein politisk raðfesting og avgerð, hvussu inntøkur landskassan verða nýttar, og mett verður tí eisini, at ein inntøka av tilfeingisgjaldi eigur at verða rindað landskassanum beinleiðis, uttan at treytir verða settar fyri, hvussu henda inntøka kann ella skal verða nýtt.

# 6. Ískoytið

**Allur flotin**

| | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 | 1999 | 1998 | 1997 | 1996 | Tilsamans | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 77 | 76 | 83 | 84 | 85 | 85 | 90 | 88 | 93 | 92 | 85 | 83 | 84 | 80 | | 84,6 |
| **Rakstur:** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **Nettosøla** | **1.392.836** | **1.572.057** | **1.959.567** | **2.064.097** | **1.686.591** | **1.555.145** | **1.687.076** | **1.861.730** | **1.952.273** | **1.570.464** | **1.313.448** | **1.367.515** | **1.167.276** | **985.106** | **22.135.181** | **1.581.084** |
| Aðrar inntøkur | 21.242 | 474 | 12.363 | 3.159 | 9.410 | 10.968 | 8.905 | 31.910 | 45.998 | 11.326 | 9.808 | 10.053 | 7.477 | 10.076 | 193.169 | 13.798 |
| Annar kostnaður | -691.403 | -815.515 | -856.842 | -907.800 | -798.619 | -757.712 | -759.115 | -754.467 | -833.296 | -686.058 | -534.640 | -483.463 | -494.537 | -423.714 | -9.797.181 | -699.799 |
| **Bruttovinningur** | **722.675** | **757.016** | **1.115.088** | **1.159.456** | **897.382** | **808.401** | **936.866** | **1.139.173** | **1.164.975** | **895.732** | **788.616** | **894.105** | **680.216** | **571.468** | **12.531.169** | **895.084** |
| Starvsfólkakostnaður | -497.644 | -588.633 | -761.372 | -771.800 | -646.215 | -610.681 | -687.860 | -773.803 | -783.558 | -657.758 | -561.254 | -580.316 | -477.790 | -397.881 | -8.796.565 | -628.326 |
| Niðurskriving av umferðarfæ | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | -1.346 | -1.677 | -4.190 | 8.698 | -32 | -1.040 | 0 | 0 | 0 | 413 | 30 |
| Avskrivingar | -160.790 | -161.349 | -159.118 | -142.496 | -133.358 | -145.880 | -152.381 | -140.503 | -145.166 | -126.784 | -100.093 | -66.595 | -97.946 | -93.865 | -1.826.324 | -130.452 |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **64.241** | **7.034** | **194.598** | **245.160** | **117.809** | **50.494** | **94.948** | **220.677** | **244.949** | **111.158** | **126.229** | **247.194** | **104.480** | **79.722** | **1.908.693** | **136.335** |
| Úrslit dóttirfelag/atknýtt felag | 2.901 | -1.886 | 1.797 | 5.555 | -1.599 | -353 | 314 | 3.646 | 11.031 | 2.189 | 2.943 | -2.937 | -1.685 | 1.832 | 23.748 | 1.696 |
| Niðurskriving av partabrøvum | -506 | -135 | -4 | 0 | 0 | -718 | 0 | -1.501 | 0 | -2.002 | -192 | 0 | 0 | -581 | -5.639 | -403 |
| Fíggjarinntøkur | 36.042 | 16.004 | 56.068 | 51.715 | 6.975 | 8.549 | 12.256 | 18.836 | 26.723 | 16.926 | 11.353 | 7.652 | 4.183 | 4.686 | 277.968 | 19.855 |
| Fíggjarútreiðslur | -145.580 | -209.080 | -133.310 | -110.814 | -74.746 | -78.826 | -81.670 | -72.158 | -83.451 | -70.978 | -65.251 | -60.027 | -59.384 | -61.550 | -1.306.825 | -93.345 |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **-42.902** | **-188.063** | **119.149** | **191.616** | **48.439** | **-20.854** | **25.848** | **169.500** | **199.252** | **57.293** | **75.082** | **191.882** | **47.594** | **24.109** | **897.945** | **64.139** |
| Óvanligar inntøkur | 1.134 | 272.140 | 10.103 | 292.676 | 37.859 | 50.774 | 33.645 | 48.380 | 128.782 | 71.398 | 61.640 | 42.589 | 35.500 | 43.907 | 1.130.527 | 80.752 |
| Óvanligar útreiðslur | -4.500 | -2.689 | -79.154 | -25.687 | -39.953 | -39.719 | -10.836 | -29.575 | -6.411 | -15.926 | -11.907 | -5.692 | -10.012 | -4.363 | -286.424 | -20.459 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-46.268** | **81.388** | **50.098** | **458.605** | **46.345** | **-9.799** | **48.657** | **188.305** | **321.623** | **112.765** | **124.815** | **228.779** | **73.082** | **63.653** | **1.742.048** | **124.432** |
| Skattur av ársúrsliti | -2.479 | -28.854 | -15.967 | -89.420 | -1.218 | -3.468 | -21.687 | -38.643 | -64.775 | -6.567 | -11.214 | -50.068 | -20.187 | -8.783 | -363.330 | -25.952 |
| **Ársúrslit** | **-48.747** | **52.534** | **34.131** | **369.185** | **45.127** | **-13.267** | **26.970** | **149.662** | **256.848** | **106.198** | **113.601** | **178.711** | **52.895** | **54.870** | **1.378.718** | **98.480** |
| *Ársúrslit áðrenn óvanligt* | *-45.987* | *-168.416* | *90.753* | *150.254* | *46.844* | *-22.332* | *8.267* | *134.242* | *156.504* | *60.711* | *72.820* | *148.455* | *31.995* | *22.444* | | |
| Eginogn ultimo | 603.463 | 745.898 | 783.149 | 787.129 | 660.137 | 831.453 | 963.598 | 1.008.993 | 902.465 | 731.759 | 623.760 | 504.236 | 273.838 | 218.585 | | |
| **Renting av eginpeningi** | **-8,08%** | **7,04%** | **4,36%** | **46,90%** | **6,84%** | **-1,60%** | **2,80%** | **14,83%** | **28,46%** | **14,51%** | **18,21%** | **35,44%** | **19,32%** | **25,10%** | | **15,30%** |
| **Renting av eginpeningi (ikki íroknað óvanligt)** | **-7,62%** | **-22,58%** | **11,59%** | **19,09%** | **7,10%** | **-2,69%** | **0,86%** | **13,30%** | **17,34%** | **8,30%** | **11,67%** | **29,44%** | **11,68%** | **10,27%** | | **7,70%** |

**Uppsjóvarskip**

| | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 | 1999 | 1998 | 1997 | 1996 | Tilsamans | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 9 | 9 | 9 | 10 | 9 | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 | 7 | 8 | 7 | | 8,3 |
| **Rakstur:** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Nettosøla | 436.945 | 522.882 | 678.882 | 742.708 | 528.656 | 373.308 | 367.925 | 446.066 | 471.282 | 272.520 | 148.923 | 275.566 | 184.346 | 178.824 | **5.628.833** | **402.060** |
| Aðrar inntøkur | 21.015 | 0 | 12.358 | 0 | 260 | 3.839 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 37.472 | 2.677 |
| Annar kostnaður | -163.328 | -221.324 | -265.692 | -310.340 | -238.688 | -172.242 | -133.938 | -150.176 | -146.657 | -115.666 | -81.879 | -82.056 | -77.141 | -61.408 | -2.220.535 | -158.610 |
| **Bruttovinningur** | **294.632** | **301.558** | **425.548** | **432.368** | **290.228** | **204.905** | **233.987** | **295.890** | **324.625** | **156.854** | **67.044** | **193.510** | **107.205** | **117.416** | **3.445.770** | **246.126** |
| Starvsfólkakostnaður | -142.199 | -169.270 | -210.862 | -223.830 | -167.055 | -113.795 | -114.711 | -140.568 | -150.260 | -85.510 | -54.754 | -92.315 | -67.518 | -62.863 | -1.795.510 | -128.251 |
| Niðurskriving av umferðarfæ | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Avskrivingar | -85.026 | -62.260 | -64.699 | -65.827 | -53.730 | -37.325 | -33.950 | -34.620 | -34.629 | -38.657 | -25.752 | -6.572 | -18.653 | -15.452 | -577.152 | -41.225 |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **67.407** | **70.028** | **149.987** | **142.711** | **69.443** | **53.785** | **85.326** | **120.702** | **139.736** | **32.687** | **-13.462** | **94.623** | **21.034** | **39.101** | **1.073.108** | **76.651** |
| Úrslit dóttirfelag/atknýtt felag | 0 | 0 | -442 | 126 | -4 | 1.886 | 255 | 3.885 | 3.650 | 1.213 | 679 | -2.952 | -2.522 | 1.967 | 7.741 | 553 |
| Niðurskriving av partabrøvum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Fíggjarinntøkur | 19.807 | 9.678 | 43.973 | 40.991 | 3.032 | 4.348 | 4.462 | 8.367 | 9.436 | 3.680 | 7.210 | 3.277 | 1.174 | 1.340 | 160.775 | 11.484 |
| Fíggjarútreiðslur | -60.580 | -106.782 | -79.078 | -68.594 | -31.433 | -25.132 | -30.447 | -18.763 | -23.543 | -23.944 | -18.848 | -12.709 | -7.621 | -6.557 | -514.031 | -36.717 |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **26.634** | **-27.076** | **114.440** | **115.234** | **41.038** | **34.887** | **59.596** | **114.191** | **129.279** | **13.636** | **-24.421** | **82.239** | **12.065** | **35.851** | **727.593** | **51.971** |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 267.591 | 0 | 252.575 | 778 | 6.561 | 0 | 0 | 63.763 | 0 | 9.544 | 8.416 | 0 | 1.085 | 610.313 | 43.594 |
| Óvanligar útreiðslur | 0 | 0 | -2.708 | -7.349 | 0 | -27.000 | 0 | -13.184 | 0 | -2.558 | 0 | -3.053 | -3.310 | -729 | -59.891 | -4.278 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **26.634** | **240.515** | **111.732** | **360.460** | **41.816** | **14.448** | **59.596** | **101.007** | **193.042** | **11.078** | **-14.877** | **87.602** | **8.755** | **36.207** | **1.278.015** | **91.287** |
| Skattur av ársúrsliti | -9.425 | -43.667 | -22.199 | -67.531 | -3.697 | -2.853 | -11.781 | -25.444 | -39.692 | 3.213 | 5.072 | -24.263 | -4.233 | -4.806 | -251.306 | -17.950 |
| **Ársúrslit** | **17.209** | **196.848** | **89.533** | **292.929** | **38.119** | **11.595** | **47.815** | **75.563** | **153.350** | **14.291** | **-9.805** | **63.339** | **4.522** | **31.401** | **1.026.709** | **73.336** |
| *Ársúrslit áðrenn óvanligt* | *17.209* | *-22.577* | *91.754* | *91.844* | *37.481* | *28.355* | *47.815* | *86.374* | *101.064* | *16.389* | *-17.631* | *58.941* | *7.236* | *31.109* | | |
| Eginogn ultimo | 327.732 | 404.852 | 281.735 | 220.648 | 207.118 | 292.486 | 354.608 | 313.794 | 247.978 | 151.806 | 142.029 | 136.189 | 50.539 | 41.221 | | |
| **Renting av eginpeningi** | **5,25%** | **48,62%** | **31,78%** | **132,76%** | **18,40%** | **3,96%** | **13,48%** | **24,08%** | **61,84%** | **9,41%** | **-6,90%** | **46,51%** | **8,95%** | **76,18%** | | **33,88%** |
| **Renting av eginpeningi (ikki íroknað óvanligt)** | **5,25%** | **-5,58%** | **32,57%** | **41,62%** | **18,10%** | **9,69%** | **13,48%** | **27,53%** | **40,76%** | **10,80%** | **-12,41%** | **43,28%** | **14,32%** | **75,47%** | | **22,49%** |

**Verksmiðjutrolarar**

| | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 | 1999 | 1998 | 1997 | 1996 | Tilsamans | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 4 | 4 | 4 | 4 | 5 | 6 | 6 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | | 4,9 |
| **Rakstur:** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Nettosøla | 235.332 | 280.070 | 349.468 | 373.120 | 278.789 | 307.850 | 286.008 | 289.922 | 264.238 | 241.392 | 259.949 | 232.231 | 315.231 | 246.235 | **3.959.835** | **282.845** |
| Aðrar inntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Annar kostnaður | -113.464 | -146.465 | -129.375 | -144.152 | -122.376 | -118.855 | -126.037 | -97.570 | -101.108 | -99.759 | -111.405 | -81.098 | -129.724 | -88.386 | -1.609.774 | -114.984 |
| **Bruttovinningur** | **121.868** | **133.605** | **220.093** | **228.968** | **156.413** | **188.995** | **159.971** | **192.352** | **163.130** | **141.633** | **148.544** | **151.133** | **185.507** | **157.849** | **2.350.061** | **167.862** |
| Starvsfólkakostnaður | -85.009 | -107.399 | -141.911 | -143.368 | -107.139 | -118.638 | -108.567 | -126.214 | -103.763 | -94.840 | -100.761 | -98.528 | -113.706 | -98.536 | -1.548.379 | -110.599 |
| Niðurskriving av umferðarfæ | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Avskrivingar | -16.751 | -25.852 | -25.749 | -24.382 | -20.792 | -24.338 | -24.071 | -21.134 | -18.353 | -19.287 | -18.341 | -14.305 | -29.372 | -26.644 | -309.371 | -22.098 |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **20.108** | **354** | **52.433** | **61.218** | **28.482** | **46.019** | **27.333** | **45.004** | **41.014** | **27.506** | **29.442** | **38.300** | **42.429** | **32.669** | **492.311** | **35.165** |
| Úrslit dóttirfelag/atknýtt felag | -682 | -1.671 | 0 | -10 | -1.135 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | -3.498 | -250 |
| Niðurskriving av partabrøvum | -37 | -12 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | -49 | -4 |
| Fíggjarinntøkur | 1.453 | 1.235 | 1.163 | 6.214 | 713 | 477 | 2.355 | 2.459 | 2.665 | 1.881 | 1.077 | 1.589 | 1.552 | 2.049 | 26.882 | 1.920 |
| Fíggjarútreiðslur | -27.832 | -28.396 | -8.081 | -10.207 | -12.323 | -12.784 | -10.372 | -9.170 | -12.135 | -11.839 | -15.577 | -13.101 | -17.029 | -15.449 | -204.295 | -14.593 |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **-6.990** | **-28.490** | **45.515** | **57.215** | **15.737** | **33.712** | **19.316** | **38.293** | **31.544** | **17.548** | **14.942** | **26.788** | **26.952** | **19.269** | **311.351** | **22.239** |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 0 | 2.484 | 8.062 | 25.354 | 0 | 798 | 0 | 2.536 | 35.310 | 656 | 6.155 | 201 | 0 | 81.556 | 5.825 |
| Óvanligar útreiðslur | -4.500 | 0 | -2.314 | 0 | -1.971 | -12.137 | -552 | -13.772 | -5.000 | -10.400 | -5.896 | -1.051 | -3.261 | -2.985 | -63.839 | -4.560 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-11.490** | **-28.490** | **45.685** | **65.277** | **39.120** | **21.575** | **19.562** | **24.521** | **29.080** | **42.458** | **9.702** | **31.892** | **23.892** | **16.284** | **329.068** | **23.505** |
| Skattur av ársúrsliti | 1.403 | 3.563 | -8.400 | -11.291 | -4.840 | -4.425 | -1.352 | -4.407 | -3.029 | -4.310 | 576 | -6.605 | -7.885 | -2.627 | -53.629 | -3.831 |
| **Ársúrslit** | **-10.087** | **-24.927** | **37.285** | **53.986** | **34.280** | **17.150** | **18.210** | **20.114** | **26.051** | **38.148** | **10.278** | **25.287** | **16.007** | **13.657** | **275.439** | **19.674** |
| *Ársúrslit áðrenn óvanligt* | *-6.397* | *-24.927* | *37.146* | *47.375* | *15.106* | *27.102* | *18.008* | *31.407* | *28.071* | *17.722* | *14.575* | *21.102* | *18.516* | *16.105* | | |
| Eginogn ultimo | 316.154 | 356.241 | 381.168 | 371.358 | 239.895 | 141.779 | 156.964 | 144.488 | 123.481 | 106.571 | 99.776 | 107.631 | 73.992 | 64.218 | | |
| **Renting av eginpeningi** | **-3,19%** | **-7,00%** | **9,78%** | **14,54%** | **14,29%** | **12,10%** | **11,60%** | **13,92%** | **21,10%** | **35,80%** | **10,30%** | **23,49%** | **21,63%** | **21,27%** | | **14,26%** |
| **Renting av eginpeningi (ikki íroknað óvanligt)** | **-2,02%** | **-7,00%** | **9,75%** | **12,76%** | **6,30%** | **19,12%** | **11,47%** | **21,74%** | **22,73%** | **16,63%** | **14,61%** | **19,61%** | **25,02%** | **25,08%** | | **13,98%** |